Limablað nr. 11 • 2026

Eldri

Landsfelag Pensjónista



EIN SÓLSKINSSØGA

SKÓTALEGAN VIÐ KIRKJUVATN Í 1958

TAÐ BER TIL AT DETTA UTTAN AT FÁA MEIN

Blaðið Eldri

Einaferð um árið gevur Landsfelag Pensjónista út blaðið Eldri. Endamálið við blaðnum er at kunna pensjónistar og onnur um ymiskt, ið áhugavert er hjá eldri, heima sum uttanlands, at lesa.

www.eldri.fo

Ábyrgd
Beate L. Samuelsen, forkvinna

Samskipari
Gunnleyg Durhuus, skrivari og samskipari

Umbróting
Grafikmaster / Kári við Rættará
www.grafikmaster.fo

Prent
Estra

Forsíðumynd
"Undirhúsið" á Eysturoyar røktar- og ellisheimi

Myndatakari
Monika Weihe Jakobsen

Baksíðumynd
Við Gjógv

Myndatakari, baksíðumynd
Gunnleyg Durhuus

Landsfelag Pensjónista

Landsfelag Pensjónista er felag fyri allar pensjónistar og øll eldri í Føroyum. Limir í Landsfelagnum eru pensjónistafeløg og eldrafeløg í Føroyum. Landsfelagið hevur til endamáls at arbeiða fyri fíggjarligum, sosialum, mentanarligum og øllum øðrum áhugamálum pensjónista.

Landsfelag Pensjónista
Løkjatún 1,
FO-160 Argir
Tel: 21 93 94
T-postur: lp@eldri.fo
Heimasíða: www.eldri.fo

INNIHALDSYVIRLIT

AÐALFUNDUR HJÁ LP 2. MAI 2026 3

LEIÐARIN: VANTANDI BJARGINGARVESTAR 4

ANDAKT VIÐ ANNIKU MAGNUSSEN GAARD, SÓKNARPRESTI 6

VÁRDAGURIN Í SMS 8

FØROYSK LUTTØKA Í VERKÆTLAN, "SENIORER NORA´S GULLRESERVE" 10

RØÐA HJÁ MARGIT STÓRÁ Á RÁÐSTEVNU 14

TAÐ BER TIL AT DETTA UTTAN AT FÁA MEIN 18

EIN SÓLSKINSSØGA 20

ÁRSVEITSLAN 2026 HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA Í DANSIFRØI 24

UPPSKRIFTIR 29

GLASMONTRA Á TREMUR VIÐ UNDIRSJÓVARSTEINASLØGUM 31

ÁRSFRÁGREIÐING VÁRIÐ 2025 - VÁRIÐ 2026 34

SKÓTALEGAN VIÐ KIRKJUVATN Í 1958 42

"BIND EIN PUNT" GAV GÓÐAR 40.000 KRÓNUR 48

FRAMTÍÐIN Á ELDRAØKINUM KREVUR BROYTINGAR 50

ELDRADAGURIN Í VARPINUM 2026 53

AVSLÁTTARAVTALUR 58

PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØG Í FØROYUM 62

LANDSFELAG PENSJÓNISTA HEVÐI AÐALFUND 2. MAI 2026



Fremst frá vinstru: Beate L. Samuelsen, Maria Olsen, Johild Joensen, Mads Guttesen og Alfred Olsen. Aftast: Sjúrður Kjølbro og Astrid Debes Jacobsen.

Leygardagin 2. mai 2026 hevði Landsfelag Pensjónista aðalfund á Hotel Hafnia, har nógv fólk møttu.

Tá Beate L. Samuelsen, forkvinna, hevði lagt fram ársfrágreiðingina, var nevndarval á skránni. Fyri vali stóðu tveir nevndarlimir og tríggir varalimir. Nevndarlimirnir Jákup Andreasen og Erhard Jacobsen stillaðu ikki uppaftur.

Í nevndina vórðu vald:
Astrid Debes Jacobsen frá Eldrafelagnum Vesturskin í Vestmanna og Johild Joensen frá Eldrafelagnum Nón í Runavíkar kommunu.

Sum varalimir vórðu vald:
Mads Guttesen, Pensionistafelagið í Havn, Sjúrður Kjølbro, Pensjónistafelagið Hugni í Klaksvík, Jens Marius Poulsen, Pensionistafelagið í Havn.

Eftir aðalfundin skipaði nevndin í Landsfelag Pensjónista seg soleiðis:
Beate L. Samuelsen, forkvinna
Maria Olsen, næstforkvinna
Alfred Olsen, nevndarlimur
Astrid Debes Jacobsen, nevndarlimur
Johild Joensen, nevndarlimur

Leiðarin:
Vantandi bjargingarvestar



Við risa ferð nærkast talið á pensjónistum teim 10.000

Tekstur: Beate L. Samuelsen

Síðani seinasta blað hjá Landsfelag Pensjónista, Eldri, kom út fyri einum ári síðani, hava vit havt løgtingsval.

Er tað nakað, sum pensjónistar ganga uppí við lív og sál, er tað spenningurin um, hvat hendir við okkum pensjónistum aftaná eitt løgtingsval. Fer komandi landsstýrissamgonga at hugsa um elsta partin av landsins borgarum? Ella fer komandi meiriluti av landsins stjórn bara at hugsa um seg sjálvan ella um lokala partin av landinum, har viðkomandi er ættaður?

Hóast tað lokala liggur hjartanum nær, so er man sum løgtingsumboð rødd alra føroyinga. Tað er eitt krav. Og við tí fylgir eisini ábyrgdin, at hesi somu eru umboð fyri allar føroyingar. Eisini okkum eldru, sum um ikki so langa tíð røkka um 10.000 føroyskum borgarum.

Vit eru sum pensjónistar ikki ein lítil minnilutabólkur. Nógvir pensjónistar eru framvegis virknir á arbeiðsmarknaðinum, bæði innan tað almenna og ikki minst innan tað privata. Harvið eru vit við til at hava samfelagshjólini koyrandi.

Hvønn dag leggjast fleiri og fleiri nýggir pensjónistar aftrat. Tíbetur er hetta talið hægri enn talið á teimum, sum av náttúrligum orsøkum fella frá. Teirra leiklutur í samfelag okkara liggur so sanniliga ikki eftir. Tað eru vit øll sera takksom fyri.

Eldraráðssessur hevði verið hentur

Eldraøkið er eitt serøki, sum í dag krevur eitt Eldramálaráð burturav.

Vit hava einki slíkt, men verða í staðin tvinnað saman við fleiri onnur øki, alt eftir, hvat málið snýr seg um. Í høvuðsheitum hoyra vit undir Almannaráðið.

Tað hevði nú verið lættari, um vit høvdu okkara egnað ráð, Eldramálaráðið.

Næsti spurningur, ið tekur seg upp í velinum á tí fyrra, er, um vit ikki hava ivaleyst av ráðum, sum eftir øllum at døma seinastu árini eins og elastikk sveiggja í tali, alt eftir, hvørjir flokkar manna landsstýrini.

Jú, rætt er. Bíligari verður tað ikki at stovna eitt ráð aftrat teim verandi, men vónandi meiri effektivt í pensjónista- og samfelagshøpi. Haraftrat lættir hetta um hjá t.d. Almannaráðnum, sum hevur fingið nýtt heiti og eitt umsitingarmál aftrat. Nú eitur tað ikki bara Almannaráðið, men Almanna- og bústaðarmálaráðið.

Sum um Almannaráðið ikki hevði nóg mikið at taka sær av frammanundan, so hevur hendan samgongan lagt bústaðarmál landsins aftrat almannaøkinum.

Um tað er rættur politikkur, kunnu vit kjakast um líka til næsta løgtingsval.

Ikki gloymd

Spenningurin var stórur, tá samgonguskjalið 2026 hjá nýggja landsstýrinum í vár var almannakunngjørt. Mundu vit vera gloymd?

Nei.

Har stendur svart uppá hvítt, at "markið fyri mótrokning av arbeiðsinntøku í fólkapensjón skal hækkast upp í kr. 300.000,-, og samstundis verður mótrokningarprosentið hækkað upp í 30 prosent".

Víðari stendur skrivað:
"Arbeiðsmarknaðargjøld skulu eisini rindast av arbeiðsinntøku hjá pensjónistum. Vit (landstýrissamgongan, blst.) vilja halda okkum til pensjónssemjuna frá 2018, samstundis sum vit lofta teimum, ið eru niðurslitin.

Samsýningin fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima skal hækkast, og skipanin gerast smidligari. Vit vilja endurskoða fyrisitingarbygnaðin í Almannaverkinum. Vit vilja virka fyri at seta eldraverju í verk. Hetta fyri at hjálpa fólki, sum eru útsett fyri ágangi, so sum fíggjarligum ágangi ella eru í vandabólki". Sitat slutt.

Nú er upp til okkum pensjónistar at halda fast í oyruni á valdu samgongupolitikarunum at halda orð viðvíkjandi hámarkinum fyri mótrokningini av arbeiðsinntøku í fólkapensjónini, sum skal hækkast upp í kr. 300.000,-.

Í hesum sambandi nevndi løgmaður í løgmansrøðu síni á ólavsøku onga krónuupphædd í mótrokningini, men bara, at aftur ein nevnd skuldi setast at endurskoða galdandi pensjónsnýskipanarlóg.

Sama søga einaferð aftrat.

Gerandisútreiðslur hækka

Sum dømi kunnu vit nevna eitt av málunum, sum næstseinasta landsstýrissamgonga beint undan løgtingsvali hevði sett sær fyri, áðrenn val varð útskrivað, at samsýningin fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima skuldi hækkast.

Tað bleiv av ongum

Í nýggja samgonguskjalinum er sama orðing frá næstseinastu landsstýrissamgongu gravað fram aftur úr rúgvuni av gloymdum lyftum.

Tískil seta vit fram her spurningin: Nær hækkar samsýningin fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima?

Veruleikin er, at tað gerst truplari og truplari hjá støkum pensjónistum einans at lívbjarga sær við verandi fólkapensjón og Samhaldsfasta. Okkum vantar samfelagsbjargingarvestar.

Matvørur dýrka hvønn einasta dag, tá nýggjar vørur verða settar á hillarnar. Tað gongur sjón fyri søgn, tá tú stendur við kassan og skal gjalda.

Sama skilið er, har oljufýringin skal hita íbúðina upp. Prísurin gongur bara skeivan veg.

Fyrst í inniverandi árið hækkaðu pensjónin og Samhaldsfasti eitt vet. Men tað munar einki, tá gerandisútreiðslurnar dýrka við risa ferð hvønn einasta dag.

ANDAKT



TANN HVÍTI KRIST HJÁ BERTEL THORVALDSEN

Hóast vit ikki altíð kunnu leggja lívsins byrðar frá okkum, so hava vit fingið lyftið um, at vit ongantíð skulu bera tær einsamøll

Tekstur: Annika Magnussen Gaard, sóknarprestur, Suðuroyar Norðara Prestagjald

Mitt í tí yðjandi og skundmikla lívið í Keypmannahavn stendur Vor Frue Kirke sum eitt friðskjól frá øllum meldrinum í stórbýnum. Uttanfyri skunda fólk sær aftur og fram. Bilar koyra, súkklur fara framvið, og býurin livir sítt egna lív. Men innan fyri tær stóru kirkjudyrnar er ein annar heimur. Har finst ein friður, ið gevur einum møguleikan at steðga á, draga ondina djúpt og sleppa øllum tí, sum fyllir gerandisdagin.

Inni í kirkjuni, heilt frammi í kórinum, stendur tann tríggjar metrar høga marmorstandmyndin av Jesusi Kristi, sum myndahøggarin Bertel Thorvaldsen hevur evnað til. Kanska hava tit verið har og sæð hana. Men um ikki, so vil eg viðmæla tykkum at fara ein túr inn í dómkirkjuna í Keypmannahavn.

Standmyndin lýsir hin upprisna Kristus við víðopnum favni. Hann er ílatin eitt stórt, sítt klæði, sum fellur frá herðunum, um kroppin og heilt oman til føturnar. Høvd hansara er eitt sindur boygt, og armarnir eru rættir út móti tí, sum kemur gangandi niðan móti altarinum. Hann lenar seg frameftir, meðan øll vektin er á høgra fóti, og tað sær út eins og, at Jesus gongur móti einum og vil hálsfevna ein.

Á sokklinum undir standmyndini standa orðini úr Matteusevangeliinum: **Kommer til mig**.

Orðini eru tikin úr tí kenda versinum hjá Matteus evangelisti, har Jesus sigur soleiðis:

"Komið higar til mín, øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu" (Matt 11,28).

Tað er nakað serligt við hesum orðum. Tey eru so einføld, men samstundis so stór. Tey rúma einum lyfti, sum rakar beint inn í mannalívið. Tí hvør okkara hevur ikki kent seg móðan? Ikki bara kropsliga, men eisini sálarliga. Hvør hevur ikki upplivað, at lívið stundum kann gerast ov tungt at bera?

Stór krøv

Tá eg gekk á tí pastoralu eftirútbúgvingini, fortaldi ein av mínum vinkonum eina søgu um eina unga kvinnu, sum var komin inn í kirkjuna, har hon var í starvsvenjing. Presturin hevði havt eina samtalu við hesa ungu kvinnu, sum hevði havt eitt trupult og tungt lív, og henni tørvaði, at onkur hoyrdi hana og sá hana í hennara líðing. Presturin las orð Jesusar í Evangeliinum eftir Matteusi, har hann biður øll, sum hava tað tungt, at koma til sín. Hesi orð høvdu eina so stóra ávirkan á hana, at hon kom til trúgv. Hvørja ferð, eg lesi orð Jesusar, hugsi eg um hesa kvinnu.

Vit menniskju bera øll byrðar. Summar eru sjónligar, meðan aðrar eru fjaldar fyri teimum, sum eru rundan um okkum. Tað kann vera sjúka, sorg, einsemi, hjartasorg ella ótti. Tað kann vera ábyrgdin av at vera foreldur, krøvini á arbeiðsplássinum ella kenslan av ikki at røkka til.

Stundum eru byrðarnar so tungar, at vit næstan ikki megna at bera tær. Og stundum kunnu tær vaksa seg so stórar, at sjálvt lívið kennist sum ein byrða.

Djúp hvíld

Vit liva í einari tíð, har nógv verður væntað av okkum. Vit skulu vera dugnalig, arbeiðssom, nærverandi og væleydnað. Vit skulu hava skil á okkara lívi, okkara arbeiði og okkara familju. Og helst skulu vit eisini vera glað og nøgd við alt tað, sum vit hava.

Men mitt í øllum hesum krøvunum kunnu vit gloyma,

at vit eisini eru menniskju, sum hava tørv á hvíld. Ikki bara ta hvíld, sum vit fáa, tá ið vit leggja okkum at sova um kvøldið, men einari djúpari hvíld. Einari hvíld, har vit ikki longur skulu prógva okkara virði, men kunnu vera til, júst sum vit eru.

Og tað er júst hetta Jesus bjóðar okkum, tá hann sigur: „Komið higar til mín."

Hann sigur ikki, at vit fyrst skulu fáa skil á okkara lívi. Hann sigur heldur ikki, at vit skulu leggja allar okkara byrðar frá okkum, áðrenn vit kunnu koma til hansara. Nei, hann biður okkum koma, júst sum vit eru. Við øllum tí, sum vit bera við okkum.

Okið ein avlasting

Men Jesus heldur á fram og sigur:

„Takið upp á tykkum ok mítt og lærið av mær; tí at eg eri spaklyntur og eyðmjúkur av hjarta, og tá skulu tit finna sálum tykkara hvíld. Tí at gagnligt er ok mítt, og lætt er byrði mín." (Matt 11,29–30)

Orðið ok er kanska ikki eitt orð, sum vit brúka so nógv longur. Men fyrr var okið eitt vanligt amboð í landbúnaðinum. Tað er reiðskapur, sum javnvigar vektina, ein trækelvi, sum verður lagdur yvir herðarnar á oksum framman fyri eitt plógjárn ella eitt akfar – ella aftan fyri nakkan á einum menniskja. Endamálið við okinum er at býta vektina javnt. Tað merkir, at ok kann hjálpa at bera tungt, og við tí kann ein bera meira, enn ein annars orkaði. Tó er okið ikki ein eyka byrða, men ein avlasting.

Vit eru ikki einsamøll

Okið tók ikki byrðuna burtur, men tað gjørdi hana lættari at bera.

Og kanska er tað júst hetta, sum Jesus vil siga okkum.

Tí trúgvin merkir ikki, at vit sleppa undan øllum tí, sum er trupult í lívinum. Hon merkir ikki, at sorgin hvørvur, at sjúkan verður grødd, ella at allar okkara stúranir verða tiknar frá okkum. Men trúgvin kann geva okkum styrki til at bera tað, sum vit annars ikki høvdu megnað at borið einsamøll.

At taka Kristi ok á seg er at læra at hvíla í áliti á Guði. At trúgva, at vit ikki eru einsamøll, heldur ikki tá ið lívið gerst tungt og óskiljandi.

Tað er ikki altíð lætt at hava hetta álitið. Serliga ikki tá ið vit standa mitt í sorgini ella mótgongdini og ikki skilja, hví lívið hevur lagað seg soleiðis, sum tað hevur. Men kanska er trúgv heldur ikki altíð tað, at vit skula skilja alt. Kanska er trúgv eisini at tora at hvíla í tí, sum vit ikki skilja.

At hvíla í trúnni er ikki tað sama sum at geva upp. Tað er heldur at geva seg yvir til ta vón, at okkara lív hvílir í Guðs hondum, eisini tá ið okkara egnu kreftir ikki røkka longur.

Venda vit aftur til standmyndina hjá Thorvaldsen, kunnu vit varnast nakað serligt. Tí koma vit heilt nær at Kristusi, síggja vit sárini í lógvunum og fótum hansara. Krossmerkini, sum vitna um ta líðing, ið hann sjálvur bar.

Tað er sostatt ikki ein Kristus, sum stendur uttan fyri menniskjans líðing og rópar á okkum. Tað er ein Kristus, sum sjálvur kennir líðingina. Ein Kristus, sum hevur kent svik, einsemi, sorg og deyða.

Og kortini stendur hann har við víðopnum favni.

Mitt í myrkrinum birtist eitt ljós, sum aldrin slóknar

Krossurin og uppreisnin minna okkum á, at líðingin ikki fær síðsta orðið. At myrkrið ikki er tað síðsta, sum verður sagt um mannalívið. Tí mitt í myrkrinum birtist eitt ljós, sum aldrin slóknar.

Kanska er tað júst hetta, sum ger standmyndina hjá Thorvaldsen so vakra. Hon lýsir ikki ein Kristus, sum krevur nakað av okkum, men ein Kristus, sum tekur ímóti okkum. Ein Kristus, ið stendur við opnum ørmum og býður okkum at koma nærri.

Og kanska er hetta eisini tað, sum vit hava mest brúk fyri at hoyra. At vit ikki altíð skulu vera sterk. At vit ikki altíð skulu megna alt sjálvi. At vit ikki altíð skulu bera allar okkara byrðar einsamøll.

Tí tað eru løtur í lívinum, har vit hava brúk fyri, at onkur annar ber saman við okkum.

Og tað er júst hetta lyftið, sum liggur í orðunum hjá Jesusi.

"Komið higar til mín"

Orðini standa rist í steinin undir standmyndini í Vor Frue Kirke, men tey eru ikki bara orð, sum eiga at vera á eini marmorstandmynd. Nei, tey eru ikki tóm og deyð orð. Tey eru livandi orð, sum verða talað til okkara enn tann dagin í dag.

Til tann, sum syrgir. Til tann, sum er einsamallur. Til tann, sum er móður av lívinum. Og til tann, sum ikki longur veit, hvussu hann skal bera sína byrðu.

Tí í trúnni er eitt rúm, har vit kunnu leggja okkara byrðar frá okkum. Eitt rúm, har vit ikki skulu gera okkum uppiborin til kærleikan, men kunnu taka ímóti honum.

Og kanska er tað júst har, at hin sanna hvíldin byrjar.

Tá ið vit tora at sleppa takinum eina løtu og lata okkum verða borin av tí kærleika, sum er størri enn vit sjálvi.

Tí hóast vit ikki altíð kunnu leggja lívsins byrðar frá okkum, so hava vit fingið lyftið um, at vit ongantíð skulu bera tær einsamøll.

Várdagurin í SMS

Hósdagin 30. apríl var afturvendandi og vælumtókta tiltakið Várdagur í SMS, har fitt av fólki var komið saman.



Fitt av fólki vitjaði tiltakið hjá Landsfelag Pensjónista í SMS

Tekstur: Beate L. Samuelsen
Myndir: Gunnleyg Durhuus

Tað tykist, sum tiltakið við einum árligum Várdegi í sølumiðstøðini SMS er komið fyri at vera.

Hetta eru vit í Landsfelag Pensjónista fegin um. Sum tað sær út fyri okkum, er eisini eldra ættarliðið fegið um tiltakið og hevur tikið tað til sín. Tað meta vit eftir, hvussu nógv eldri fólk vitja á torginum tann tíman, tiltakið er.

Hesa løtuna einaferð um árið hevur SMS latið upp til okkum í Landsfelag Pensjónista at taka okkum av. Vit hava nú í nøkur ár skipað fyri Várdegnum og hava havt fríar teymar, og avgera sjálvi, hvat vit brúka løtuna til.

Tað eru vit takksom fyri. Eisini eru vit fegin um, at Sølumiðstøðin ger so nógv fyri at hugna um á Torginum m.a. við at seta borð og stólar fram til tey vitjandi og servera kaffi, thé og køkur fyri gestunum.

Á Várdegnum hesuferð varð lagt til brots beint eftir døgurða klokkan 13 við einum fjølbroyttum sofapráti á einum hugnaligum uppsettum palli.

Beate L. Samuelsen og Martin Joensen, tónleikari

Vit høvdu bjóðað trimum gestum við. Verturin, Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista, tosaði fyrst við Mariu Olsen, forkvinnu í Pensjónistafelagnum Hugna í Klaksvík, sum greiddi frá virksemi felagsins.

Síðani greiddi Hanna Olsen frá sínum arbeiði innan Vitjanartænastuna hjá Reyða Krossi í Runavíkar kommunu. Har er hon samskipari og vitjanarvinur. Hon greiddi m.a. frá, hvussu man verður góðkendur sum vitjanarvinur, hvussu mann ber seg at fyri at fáa ein vitjanarvin, og tá tað snýr seg um tagnarskyldu.

Tónlistarlig sloyfa

At enda høvdu vit prát við Sofie Falkenberg, sum starvast á reklamufyritøkuni Nudlavirkinum.

Vegna íslendska happadráttin "DAS" hevur Nudlavirkið fingið samstarv í lag millum íslendingar og Landsfelag Pensjónista. Sofie Falkenberg greiddi frá samstarvinum, sum snýr seg um at fáa føroyingar at binda puntar úr resttógvi. Puntarnir í støddini 15x15 cm verða síðani seymaðir saman til klútateppir. Hesa arbeiðsgongd hevur Nudlavirkið átikið sær.





Áhugin fyri at binda puntar var sera stórur. Vit fingu eina rúgvu av posum í øllum støddum á tremur við heimabundnum puntum í alskyns litum, sum kvinnur í øllum aldri í bindiklubbum og aðra staðni runt landið hava sitið og putlast við. Eisini onkur maður hevur sitið við stokkum og bundið.

Fyri hvønn puntin letur "DAS" 10 føroyskar krónur til Landsfelag Pensjónista, tó í mesta lagi 50.000 krónur tilsamans. Peningurin skal setast inn á kontu hjá Landsfelag Pensjónista og oyramerktur brúkast til okkurt tiltak til frama fyri føroyskar pensjónistar.

Sum eina sloyfu aftan á Várdagin 2026 hjá Landsfelag Pensjónista, kom vestmenningurin og tónasnillingurin Martin Joensen á pallin og sang kendar egnar sangir við somuleiðis egnum løgum.

Her kann leggjast aftrat, at tá samanum kom, fekk Landsfelag Pensjónista ein kekk, áljóðandi 40.560 krónur frá DAS, ið Niels Uni Dam, stjóri í Nudlavirkinum, handaði nevndini hjá Landsfelag Pensjónista.

Frá vinstru: Beate L. Samuelsen, Maria Olsen, Sofie Falkenberg og Hanna Olsen

FØROYSK LUTTØKA Í VERKÆTLAN "SENIORER NORA'S GULLRESERVE"

Landsfelag Pensjónista er farið í samstarv við norðurnorska pensjónista-felagsskapin Nordland Eldreråd, íslendska pensjónistafelagið LEB og grønlendska pensjónistafelagið GL, um eina verkætlan "Seniorer NORA´s gullreserve".



Felagsmynd av luttakarunum í verkætlanini Seniorer NORAs Gullreserve

Tekstur og myndir: Gunnleyg Durhuus

Endamálið er at fáa tætt samband millum føroysk, norsk, íslendsk og grønlendsk pensjónistafeløg og í felag samskipa fyri tøttum samstarvi. Endamálið var at søkja norðurlendska felagsskapin NORA um fígging til hesa stóru verkætlan, sum fór av bakkastokki í september í ár.

Fígging er fingin frá NORA, kr. 500.000. Vit hava havt fleiri videofundir og eitt tiltak í Føroyum í september í ár. Hetta er ein tvey ára long verkætlan, har vit hittast í 2027 í Norðurnoreg í apríl og í Íslandi í november. Endamálið við verkætlanini er at vísa á, at eldri eru ein arbeiðsorka við týdningar-miklum virðum fyri samfelagið. Eisini verður arbeitt við betran av ymsum viður-



Margit Stóra, landsstýriskvinna í almanna- og bústaðamálum, hevði framløgu á fundinum

skiftum fyri eldri, m.a. arbeiða vit í Føroyum við betran av tannheilsu hjá eldri.

Høvuðsevni fyri hvørt land eru:

FØROYAR

Økja um luttøkuna hjá eldri á arbeiðsmarknaðinum

- Gjøgnumgongd av forðingum og møguleikum fyri at seta eldri fólk í starv á fulla ella partvísa tíð, íroknað viðkomandi pensjónsreglur og inntøkumørk. Mangul uppá arbeiðsmegi, serliga innan umsorganar- og røktarøkið, ger nýggj átøk neyðug.

Trygging av tannheilsuni hjá eldri (fíggjarliga og í praksis)

- Vánalig tannheilsa ávirkar bæði almenna heilsu, lívsgóðsku og møguleikan at taka lut í samfelagnum. Meting av átøkum, sum kunnu styrkja atgongd til tannheilsutænastur og fíggjarligan stuðul til hesar tænastur.

NOREG

Lógar- og reglugerðir fyri luttøku hjá eldri í arbeiðs- og samfelagslívinum

- Kanning av serligum aldursmørkum, møguleikum fyri eldri í vinnulívinum sum sjálvstøðug vinnurekandi, og avbjóðingum knýttum at sjálvbodnum arbeiði. Talgilding og inkludering av



Ann Askham, ferðaleiðari, greiðir luttakarunum frá um Tórshavn

eldri fyri at tryggja virknan borgarliga luttøku. Tørvur er á smidligari skipanum, sum gera tað lættari hjá eldri at geva sítt íkast og taka lut.

Eldri sum vegleiðarar hjá yngri – tørvur á einari skipaðari tilgongd

- Stórur møguleiki er fyri øktari nýtslu av eldri sum vegleiðarar hjá ungum: Lesandi, lærlingum, ungum í vanda fyri at detta úr útbúgvingarskipanini og starvsfólki tíðliga í yrkisleiðini. Hugt verður at fyrimyndum, royndum og møguligum bygnaðum fyri at menna góðar mentorskipanir.

ÍSLAND

Harðskapur og diskriminering av eldri

- Umfatar bæði likamligan og sálarligan harðskap, fjaldan og opnan yvirgang, umframt fíggjarliga misnýtslu. Kortlegging av støðuni í dag og meting av átøkum til betri verju, fyribyrging og uppfylging.

Einsemi og sosial isolation millum eldri

- Einsemi kann elva til fleiri neiligar heilsuligar avleiðingar, eitt nú vánaliga kostvenju, rúsevnistrupulleikar og viknaða sálarliga heilsu. Støða, orsakir og møgulig átøk fyri at minka um sosiala isolatión.

GRØNLAND

Eldri sum arbeiðsorka

- Eldri, ið eru før fyri at arbeiða eftir pensjónsaldur, skulu hava møguleika til tess.

Her standa luttakararnir á løgmanstrappuni í Tinganesi



Viðkomandi eykaevni í endaligu frágreiðingini

- Hvørjar forðingar og hvørjir møguleikar eyðkenna eldratilfeingið í NORA-økinum komandi árini?

- Uppskot til, hvussu NORA ella ein norðurlendskur hugsanarstovnur (tænketank) kann menna átøk, ið gagnnýta eldratilfeingið.

- Uppskot um eina NORA-ráðstevnu, har úrslit og tilmæli úr frágreiðingini verða løgd fram, helst saman við sjónarmiðum um bæði ung og eldri.



Við Norðradalsskarð kundu gestirnir njóta stórsligna útsýnið

Røða á ráðstevnu um "Seniorer NORAs Gullreserver"

Landsfelag Pensjónista – Hotel Hafnia 18. september 2026.
Margit Stóra, landsstýriskvinna í Almanna- og bústaðamálum

Kære alle sammen

Tak for invitationen til dette seminar og tak for det meget præcise og tankevækkende tema: Seniorer – NORAs gullreserver.

En guldreserve er noget værdifuldt, som et samfund kan trække på, når det har brug for styrke og stabilitet. Men billedet kan også misforstås. En reserve kan lyde som noget, man gemmer væk og først finder frem, når der mangler andre muligheder. Sådan skal vi ikke se på vores seniorer.



Margit Stóra, landsstýriskvinna í Almanna- og bústaðamálum

Ældre mennesker er ikke en passiv reserve. De er allerede en aktiv og værdifuld del af vores samfund – på arbejdspladserne, i familierne, i foreningslivet og i lokalsamfundene.

Derfor handler dagens tema ikke kun om, hvad seniorer kan gøre for samfundet. Det handler også om, hvad samfundet skal gøre for at skabe plads til, at mennesker kan bidrage og leve et godt liv gennem hele alderdommen.

Vi lever længere end tidligere. Det er først og fremmest en stor samfundsmæssig succes. Flere får mange gode og aktive år efter den traditionelle pensionsalder. Samtidig betyder udviklingen, at vi skal tænke anderledes om arbejdsliv, pension, frivillighed og velfærd.

Den samme løsning passer ikke til alle. Nogle ønsker at arbejde længe. Andre har behov for at trække sig tilbage. Nogle har overskud til at yde en stor frivillig indsats. Andre har brug for hjælp og omsorg. En god seniorpolitik skal kunne rumme hele denne forskellighed.

Arbejdsmarkedet er et oplagt sted at begynde. I mange brancher mangler vi arbejdskraft, og samtidig har vi seniorer med stor faglig viden, erfaring og dømmekraft. Det er en ressource, som vi ikke har råd til at overse. Erfaring kan ikke altid aflæses i et eksamensbevis eller måles i tempo. Den viser sig også i evnen til at se sammenhænge, håndtere vanskelige situationer, lære fra sig og skabe ro og kontinuitet på en arbejdsplads.

Men hvis flere seniorer skal have mulighed for at blive længere på arbejdsmarkedet, er det ikke nok blot at hæve pensionsalderen eller opfordre folk til at fortsætte. Arbejdspladserne skal også være indrettet til et langt arbejdsliv. Der kan være behov for fleksible arbejdstider, mulighed for deltid, mindre fysisk belastende opgaver eller en gradvis overgang fra arbejde til pension. For nogle kan en mentorrolle være meningsfuld, hvor erfaring og faglig viden bliver givet videre til yngre kolleger.

Det afgørende er, at fleksibiliteten går begge veje. Samfundet har brug for seniorernes arbejdskraft, men seniorerne skal ikke blot tilpasse sig arbejdsmarkedets behov. Arbejdsmarkedet må også tilpasse sig de mennesker, vi gerne vil fastholde.

Overgangen mellem arbejde og pension behøver heller ikke at være en skarp grænse. For mange vil det være attraktivt at gå gradvist ned i tid eller at vende tilbage til arbejdsmarkedet i kortere perioder. Men så skal reglerne understøtte det og være gennemskuelige. I det færøske koalitionsgrundlag er det aftalt at hæve grænsen for modregning af arbejdsindkomst i folkepensionen til 300.000 kroner. Det skal indgå i det videre arbejde med at indrette en ordning, som både tager hensyn til lysten til at arbejde og til balancen i pensionssystemet. Det afgørende er, at mennesker tydeligt kan se, hvad ekstra arbejde betyder for deres økonomi.

Samtidig skal vi huske dem, der gerne vil arbejde, men som ikke bliver inviteret indenfor. Når en arbejdsplads søger nye medarbejdere, bør kompetencer og egnethed være afgørende - ikke fødselsåret. Derfor hænger kampen mod aldersdiskrimination også sammen med adgangen til efteruddannelse og kompetenceudvikling. Koalitionsgrundlaget lægger op til at styrke livslang læring og til, at medarbejdere på det offentlige arbejdsmarked i større grad skal kunne gå op eller ned i arbejdstid. Det kan give flere seniorer en reel mulighed for at blive længere på arbejdsmarkedet uden nødvendigvis at fortsætte på helt samme vilkår som tidligere.

Vi skal samtidig passe på ikke at gøre det lange arbejdsliv til en moralsk målestok. Mennesker har haft meget forskellige arbejdsliv. En person, der har haft et fysisk krævende arbejde siden ungdommen, står ikke nødvendigvis i samme situation som en person, der har haft et mindre fysisk belastende arbejdsliv. Helbred, arbejdsmiljø og livsvilkår er forskellige. Muligheden for at arbejde længere skal være reel, men den skal ikke blive til en forventning, som får den enkelte til at føle skyld over at gå på pension.

Her møder vi også spørgsmålet om aldersdiskrimination. Den kan være tydelig, når en kvalificeret ansøger bliver valgt fra alene på grund af sin alder. Men den kan også være mere skjult. Det sker, når man automatisk går ud fra, at en ældre medarbejder ikke ønsker at lære nyt, ikke kan bruge ny teknologi eller ikke er interesseret i udvikling. Sådanne forestillinger kan lukke døre længe før den formelle pensionsalder.

Aldersdiskrimination kan også gå den anden vej, hvis vi forventer, at alle ældre skal være aktive, sunde, selvhjulpne og produktive. Menneskets værdi afhænger ikke af, om det fortsat kan arbejde, passe børnebørn eller udføre frivilligt arbejde. Et værdigt samfund ser både den stærke senior og den ældre, som har brug for

støtte. Vi skal møde mennesker som individer – ikke som én aldersgruppe med bestemte egenskaber.

Frivilligt arbejde er et andet område, hvor seniorer yder en helt uvurderlig indsats. I vores små nordatlantiske samfund er meget af det, vi tager for givet, båret af frivillige kræfter: idrætsforeninger, kultur, sociale fællesskaber, menigheder, besøgsvenner og lokale arrangementer. Mange seniorer har både erfaring og tid til at engagere sig, og det skaber værdi for andre. Det kan samtidig give den enkelte fællesskab, struktur og mening i hverdagen.

Men frivillighed skal være frivillig. Den må ikke blive en usynlig erstatning for offentlige velfærdsydelser eller en forventning om, at ældre mennesker skal udfylde alle de huller, som samfundet ikke selv løser. Den frivillige indsats fungerer bedst som et supplement, der skaber menneskelig kontakt og fællesskab – ikke som en erstatning for faglig hjælp og et offentligt ansvar.

Når vi taler om velfærdstjenester til ældre, kan vi ikke undgå at tale om økonomisk holdbarhed. Jeg ved, at dagens diskussion om holdbarhed og udgifterne på ældreområdet kan opleves som hård. Vi skal naturligvis tage ansvar for, at der også i fremtiden er råd til pensioner, pleje og sundhedsydelser, og vi skal hele tiden overveje, hvordan pengene bruges bedst. Men det er vigtigt for mig at sige klart: I ældre er ikke problemet, og de skal ikke bære skylden for, at befolkningens sammensætning ændrer sig. De har arbejdet, betalt skat og været med til at opbygge det velfærdssamfund, vi har i dag. Derfor må debatten ikke reducere ældre mennesker til en udgiftspost.

Holdbarhed handler også om retfærdighed, tryghed og tillid mellem generationerne. Vores opgave er at finde løsninger, der både er økonomisk ansvarlige og socialt værdige.

En del af løsningen er at forebygge tidligere og bruge nye muligheder klogt. Koalitionsgrundlaget lægger blandt andet vægt på velfærdsteknologi, rehabilitering og genoptræning. Det kan bevare funktionsevnen og gøre det muligt at blive længere i eget hjem. Men teknologien skal tage udgangspunkt i mennesket. Den må ikke erstatte nødvendig personlig kontakt eller skabe barrierer for dem, der ikke er fortrolige med digitale løsninger.

Vi skal også se den ældres liv som en helhed. Velfærd handler ikke kun om hjemmehjælp, medicin eller en plejehjemsplads, men også om bolig, transport, ernæring, fællesskab og muligheden for at deltage i samfundslivet. Koalitionsgrundlaget peger blandt andet på almennyttige boliger til ældre, en mere fleksibel godtgørelse til dem, der passer ældre og hjælpeløse i hjemmet, og en ældrebeskyttelsesordning mod blandt andet økonomiske overgreb. Initiativerne er forskellige, men bygger på samme tanke: Den enkelte skal kunne leve så trygt, selvstændigt og værdigt som muligt.

Fremtidens velfærd handler også om at forebygge tidligere. Gode boliger, fysisk aktivitet, social kontakt og tidlig hjælp kan bevare funktionsevnen og livskvaliteten længere. Forebyggelse må dog ikke forstås

som et individuelt ansvar alene. Ikke alle har de samme økonomiske muligheder, det samme helbred eller det samme netværk. Samfundet skal skabe rammer, hvor det sunde og aktive liv faktisk er muligt – også i mindre bygder og yderområder.

I den sammenhæng fortjener tand- og mundsundhed langt større opmærksomhed. Jeg ved, at der også holdes et oplæg om ældres tandsundhed ved dette seminar, og det er et vigtigt emne. Dårlig tandsundhed kan give smerter, gøre det vanskeligt at spise og påvirke både ernæring, tale, selvværd og lysten til at være sammen med andre. For nogle ældre bliver tandpleje vanskeligere på grund af sygdom, nedsat bevægelighed, demens eller økonomi. Andre mister måske den regelmæssige kontakt til tandplejen, når hverdagen ændrer sig. Derfor er det vigtigt, at tandsundhed tænkes ind i den samlede omsorg og forebyggelse.

Når vi skal udvikle fremtidens velfærd, bør vi gøre det sammen med de mennesker, det handler om. Alt for ofte taler vi om ældre uden at tale med ældre. Seniororganisationerne har derfor en vigtig rolle. De kan gøre opmærksom på problemer, som ikke altid er synlige i administrationen, og de kan bidrage med erfaringer fra hverdagen.
Inddragelse bør ikke være en formalitet, der kommer til sidst. Den bør ske tidligt, mens løsningerne stadig kan påvirkes.

Det nordiske og nordatlantiske samarbejde giver os en særlig mulighed for at lære af hinanden. Vores samfund er forskellige, men mange af udfordringerne er de samme: mangel på arbejdskraft, flere ældre, pres på velfærdsydelserne og behovet for at bekæmpe ensomhed og diskrimination. Ingen af os har fundet alle svarene. Netop derfor er det værdifuldt at dele både de løsninger, der virker, og de erfaringer, der ikke blev som forventet.

For mig er den vigtigste pointe, at en god seniorpolitik ikke alene kan måles på, hvor mange ældre der fortsætter på arbejdsmarkedet, eller hvor meget frivilligt arbejde de udfører. Den skal også måles på frihed, værdighed og deltagelse. Har den enkelte mulighed for at vælge? Bliver man mødt med respekt? Kan man få hjælp, når behovet opstår? Og er der plads til fortsat at være en del af fællesskabet?

Hvis vi virkelig betragter seniorerne som NORAs guldreserve, skal vi også behandle dem som noget værdifuldt. Det betyder, at vi skal åbne arbejdsmarkedet, bekæmpe aldersdiskrimination, støtte frivillige fællesskaber og sikre velfærdstjenester, som ser hele mennesket. Og det betyder, at vi skal lytte til seniorerne selv.

Ældre mennesker er ikke kun modtagere af velfærd. De er medborgere med erfaring, ønsker, rettigheder og ressourcer. De har været med til at bygge det samfund, vi lever i, og de er fortsat med til at forme det. Vores opgave er at skabe rammer, hvor de kan gøre det på deres egne vilkår – og hvor der også er tryghed og hjælp, når kræfterne ikke længere rækker.
Jeg håber, at dette seminar kan bringe os videre i den retning. At vi kan inspirere hinanden, udfordre vanetænkningen og tage nye idéer med hjem. For spørgsmålet er ikke kun, hvordan vi får råd til flere ældre. Spørgsmålet er, hvordan vi skaber gode samfund med flere ældre.
Tak for ordet



Í fjør heyst skipaði Judo Føroyar fyri ókeypis skeiðum runt Føroya land í falltrygd

TAÐ BER TIL AT DETTA UTTAN AT FÁA MEIN

Judo Føroyar og Landsfelag Pensjónista skipaðu fyri ókeypis skeiðum í falltrygd í oktober mánaða í fjør.

Tekstur og myndir: Jákup Andreasen

Øll koma út fyri at fara um koll onkuntíð í lívinum, og hjá eldri fólki er størri vandi fyri at fáa mein av hesum og hjá summum varandi mein. Men tað ber til at læra seg at detta uttan at fáa mein, og tey, sum íðka judo, eru serfrøðingar á hesum økinum.

Tí bjóðaði Judo Føroyar, Landsfelag Pensjónista og fleiri judo- og eldrafeløgum í landinum ókeypis skeið í falltrygd fyri eldri í døgunum frá 22. til og við 24. oktober 2025 ymsastaðni í landinum. Judosambond í grannalondunum hava góðar royndir at skipa slík skeið, og tí helt Judo Føroyar tað vera áhugavert at royna hetta



Skeiðsleiðararnir vóru úr Kroatia



Elisabeth Hummeland fær undirvísing

skeið í Føroyum eisini. Uppgávan hjá Landsfelag Pensjónista var at kunna limafeløgini um skeiðini, meðan Judo Føroyar átók sær uppgávuna at fyrireika skeiðini, senda umsóknir um stuðul, og annars taka sær av øllum praktiskum viðurskiftum í sambandi við skeiðini.

Øll fingu okkurt burturúr

Tá avtornaði, vóru skeið skipað í hesum støðum: Vestmanna, Tórshavn, á Giljanesi og á Oyrabakka. Tvær ungar kvinnur úr Kroatia vóru komnar til Føroya. Saman við Sannu Djurhuus, aðalskrivara í Judo Føroyar, stóðu tær fyri teimum praktisku venjingunum kring landið.

Tær løgdu bleytar judomáttur á gólvið, og so stóð tað teimum møttu í boði at taka aktivan lut í venjingunum. Sjálvt um skeiðið var ætlað eldri, so var onki fast aldursmark, onki krav var um tilmelding, og heldur ikki var tað krav at verða limur í einum eldrafelag.

Í Vestmanna, har eg sjálvur var við, vóru eini 30 fólk møtt til skeiðið í falltrygd – meirilutin var kvinnur, men nakrir menn møttu eisini. Eini 10 av hesum tóku aktivan lut í venjingunum, meðan hini hugdu at. Sjálvt um tað er avmarkað, hvat fæst burturúr einum skeiði upp á ein tíma, so fingu øll eitt sindur burtur úr. Ongin rindaði luttakaragjald, tí breiddarpuljan hjá ÍSF og Europeiska Judosambandið rindaðu kostnaðin.



Áhugin fyri falltrygd var stórur millum pensjónistar í Vestmanna



Menn i Undirhúsinum á Eysturoyar røktar- og ellisheimi

Ein sólskinssøga

Á Eysturoyar røktar- og ellisheimi hava tey eitt vælvirkandi sjálvboðið "Undirhús", ætlað monnum og við nærveru í hásæti

Tekstur: Beate L. Samuelsen
Myndir: Monika Weihe Jakobsen

Tað eru neyvan øll, sum vita, hvussu nógv sjálvboðin fólk við jøvnum millumbili vitja okkara eldru borgarar, sum búgva á røktar- og ellisheimum.

Hesi gera einki hóvasták burturúr sær sjálvum, men eru gull verd, ikki bara hjá teimum, sum fáa hesar vitjanir, men eisini hjá starvsfólkunum á eldrastovnunum.

Á Eysturoyar røktar- og ellisheimi eru tey sera heppin at hava eitt nærumhvørvi, har samstarvsráð, einstaklingar, skúlar, kirkjur, samkomur og fyritøkur hava gjørt av at leggja tíð og orku í at ríka lívið hjá búfólkunum.

"Hetta eru vit ómetaliga takksom fyri, og er hetta ein sera góð hjálp til starvsfólk, ið verða meira og meira upptikin av at røkja tær uppgávur, ið liggja í dagligu røktini", sigur Randarsól Kristiansdóttir, deildarleiðari.

"Lívið skal livast og hava innihald, ið stimbrar okkum sálarliga, eisini tá vit gerast eldri, sjúk og óhjálpin.

Júst hesin parturin, verður ofta valdur frá, tá tíðin hjá starvsfólkum illa røkkur til annað enn til ta lívsneyðugu røktina. Tá er

gott, at nærumhvørvið sær virði í at leggja tíð og orku í at traðka til".

Alt ger mun

Dømini eru mong, hvussu hetta kann fyriskipast.

Talan kann verða um eina vitjan av og á, at fyriskipa tiltøk, skipa fyri andaktum, sangløtum, bindiklubbum, lesa eina søgu, o.a. Alt ger mun og viðvirkar til trivnað og lívsgleði hjá búfólkunum.

Víðari sigur Randarsól Kristiansdóttir, at tey sum starvsfólk síggja, at tað ger serligan stóran mun, tá tiltøk eru væl samskipað og afturvendandi.

Eitt av hesum tiltøkum á Eysturoyar røktar- og ellisheimið er vitjan frá einari lokalari fyritøku.

Í 2022 setti leiðslan á fyritøkuni seg í samband við stovnin, og spurdi, um tað var





Hjálpsemi í Undirhúsinum

okkurt, fyritøkan kundi hjálpa við á ellisheiminum.

Randarsól Kristiansdóttir upplýsir, at tankin handan áheitanina var, at tað gekk fyritøkuni væl, og at man tí vildi geva aftur til samfelagið /nærumhvørvið, kanska serliga tey eldru, ið høvdu lagt lunnar undir ta framgongd, ið fyritøkur og samfelagið sum heild nú nýta gott av.

Fleiri hjálparar í Undirhúsinum



Búfólk og hjálparar hugna sær í Undirhúsinum á Eysturoyar røktar- og ellisheimi

"Vit ynsktu átakinum vælkomnum og fóru undir eina tilgongd at finna útav, á hvønn hátt hjálpin kundi skipast soleiðis, at átakið varð haldbart og gevandi fyri allar partar".

"Undirhúsið"

Fyritøkan ynskti at seta ein seinnapart av um vikuna, áleið tveir tímar, ialt fýra starvsfólk, sum tvey og tvey skuldu skiftast til at møta upp.

Deildarleiðarin upplýsir víðari, at tosað varð um ymiskt, m.a. biltúrar og onnur tiltøk, ið setti ávís krøv um fyrireiking til sjálvbodnu hjálpina umframt starvsfólkið. "Ymiskt varð roynt, so sum framløga um ávís viðkomandi átøk í samfelagnum, samvera, har vit sum starvsfólk vóru við til at skipa samveruna sum ein aktivitet", sigur hon.

Eftir eina tíð varð eyðsæð, at tað, ið gav búfólkunum mest, vóru løturnar, har nærvera var í hásæti.

Tey sjálvbodnu vóru allir menn. Tosið fall tí ofta á evnir, ið vaktu áhugan hjá monnunum. Eldru menninir lýstu upp tá teir hoyrdu um tað, ið nú gekk fyri seg í tí nærum-



Randarsól Kristiansdóttir, deildarleiðari

hvørvinum, teir kendu so ómetaliga væl. Sostatt varð tiltakið kallað “Undirhús“, og hevur tað líka síðani koyrt við føstum steðgi, tá summarferia er fyri.

Hetta er sera væl fyriskipað, tí fyritøkan hevur ein kontaktpersón í leiðsluni á røktarheiminum, ið samskipar frávik o.a. Seinastu áleið tvey árini er vitjunartíðspunktið broytt til at fara fram aðru hvørja viku. Altíð sama vikudag.

Køkurin kemur við sínum íkasti og ger hvørja ferð okkurt gott aftur við kaffinum. Somuleiðis vita starvsfólkini altíð, nær "Undirhúsið" er, soleiðis at tey kunnu stuðla monnunum í at møta rættstundis.

Høgt í metum

Randarsól Kristiansdóttir, deildarleiðari, upplýsir, at eftir at átakið hevur koyrt í nærum fimm ár, kunnu tey á Eysturoyar røktar- og ellisheimi við vissu staðfesta, at sjálvboðið arbeiðið kann verða ómetaliga gevandi og verða ein gongd leið eisini á eldraøkinum.

"Tað krevur einans, at vit megna at definera endamálið við samstarvinum og, at vit samskipa átakið væl".

"Á okkara røktarheimi er "Undirhúsið" høgt í metum.

Okkara eldri menn síggja fram til vitjanina av fyrikomandi “ungu” monnunum, ið bjóða teimum ein góðan drekkamunn, meðan teir tosa um skip, fiskiskap, politikk, skemta, flenna, stuðla og hjálpa fittu gomlu monnunum, ið teir kenna sum lærarar, maskinmenn, skiparar, fiskimenn, handilsmenn, handverkarar o.a."

"Tann seinnapartin, vitjanin í "Undirhúsinum" varar, sleppa teir allir at verða júst tað", upplýsir ein fegin Randarsól Kristiansdóttir, deildarleiðari, at enda.

ÁRSVEITSLAN 2026 Í DANSIFRØI – EIN HUGNALIG LØTA FYRI PENSJÓNISTAR

Leygarkvøldið 29. mars var Dansifrøi í Tórshavn aftur karmur um eina av ársins mest vælumtóktu veitslum hjá Landsfelag Pensjónista. Hetta kvøldið hittust limir úr pensjónista- og eldrafeløgunum kring landið til eina hugnaliga og fjølbroytta veitslu við mati, sangi, røðum og dansi.



Nógv fólk vóru á Ársveitsluni í Dansifrøi

Tekstur: Gunnleyg Durhuus
Myndir: Tindra v. Rani Joensen

Leygardagin 21. mars 2026 varð Ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónista hildin í Dansifrøi – eitt kvøld, har felagsskapur, góður matur og undirhald vóru í miðdeplinum. Hetta var ein kærkomin møguleiki hjá eldri at savnast, endurnýggja vinarbond og njóta lívið saman við góðum fólki.

Hugnalig byrjan

Longu klokkan 16.30 lótu dyrnar upp, og fólk komu saman til vælkomudrykk og hugnaligt prát. Samstundis varð høvi at keypa lutaseðlar, og stemningurin var beinanvegin góður, har fólk heilsaðu upp á hvønn annan. Nógv gleddust um at síggja kenningar, ið tey ikki hava sæð í fleiri ár.



Hugni við borðhaldið



Maria Olsen og Mads Winther selja lutaseðlar



Jógvan Fríðriksson, bispur, heldur røðu



Poul Havn sigur nøkur orð



Tónleikararnir syrgdu fyri góðum stemningi



Lutaseðlavinnarar av málningi eftir Jacob Fuglø



Borðreitt var við góðum mati fra Ruben Busk



Lutaseðlavinnari av málningi eftir Andreu Kjeld



Gott lag við borðið

Áðrenn borðhaldið byrjaði, bjóðaði Beate L. Samuelsen, forkvinna, vælkomin. Stutt eftir tók Alfred Olsen, borðstjóri, orðið og leiddi kvøldið trygt og gott víðari. Felagssangur var ein natúrligur partur av kvøldinum, og skapti ein serligan veitsluróma.

Góður matur

Áðrenn maturin kom á borðið, greiddi kokkurin, Ruben Busk, frá matarskránni, sum lovaði eina góða mataruppliving. Síðan varð borðreitt við forrættinum:

Lættsaltaður laksur við sitrónpure, salati, flutes og estragonsmøri – ein frísk og vælsmakkandi byrjan.

Eftir enn ein felagssang og eina hugvekjandi røðu frá Jógvani Fríðrikssyni, bispi, varð høvuðsrætturin borin fram, ið var oksasteik við stórum útvali av grønmeti og sós, og til endans ein søtur eftirrættur við sitrónfromasju, vaniljukrem, marengs og bláberum – eitt satt veitslumáltíð.



Hjúnini Áshild og Petur Henry Kristiansen vunnu málning eftir Jacob Fuglø



Góður dansur



Føroyski dansurin gekk væl

Stuttligar frásagnir

Felagssangurin helt fram undir borðhaldinum. Síðan var orðið frítt. Fleiri tóku orðið til stuttligar og hugnaligar frásagnir, sum fingu láturin at runga. Hetta var ein løta, har minnini og søgur fingu lív.

Nógvir góðir lutaseðlavinningar

Spenningurin var stórur, tá lutaseðlarnir vóru drignir. Nógvir góðir vinningar vóru at vinna – millum annað ferðir við Atlantic Airways og Norrønu, listaverk og ymsar gávur.

Føroyskur og enskur dansur

Farið var uppá gólv beinleiðis frá borðhaldinum, og varð føroyskur dansur við Rasmus Joensen og Ólavur Lydersen sum skipaðu. Hetta er ein góður siður, sum savnar fólk í ringinum og gevur eina serstaka felagsskapskenslu. Seinni varð eisini enskur dansur við livandi tónleiki frá Ólavi Højgaard, Holgar Jacobsen og Paula Magnussen. Dansigólvið fyltist, og gleðin var eyðsýnd, meðan dansað varð til væl eftir midnátt.





Tóri Jacobsen vann eitt koparprent av Nólsoynni eftir Gunnleyg Durhuus

Kenningar møtast

Ársveitslan í Dansifrøi er nógv meira enn bara ein veitsla – hon er ein hátíðarlig og hjartalig samvera, har pensjónistar kenna seg væl og eru partar av einum sterkum felagsskapi.

Hetta er ein dagur, sum gevur bæði gleði og góð minni við sær heim aftur.

Anna Maria Petersen vann ferðina við Atlantic Airways á 2.000 kr.



Tekstur og myndir: Jóhanna á Tjaldrafløtti

Dampaður fiskur við smørstoktum spísskáli – 6 fólk

- 1 spísskál
- 1 bát av hvítleyki
- 25 g av smør
- 1 súpisk av olju
- salt

- 800 g. av toska- ella hýsuflaki
- 1 súpsk. av smør
- 1 súpisk av olju
- 2 súpisk av vatni
- 1 súpisk av sitronsevju
- salt

Skola kálið og tak uttasta lagi av, um neyðugt. Sker kálið í 4 ella 6 stk. eftir longdini, alt eftir stødd.

Koyr smør, olju og hvítleyk á pannuna og steik kálið á pannuni í uml. 6 min á hvørjari síðu. Koyr evt. 1 dl av hvítvíni ella súrepladjús á pannuna og legg lok á.

Sker flakið í hóskandi petti og stroy eitt sindur av salti omaná. Hita ovnin til 190 °C. Koyr smør, olju, sitrónsevju, ¼ tesk. av salti og vatn í eitt ovnfast fat. Set í ovnin, til smørið er smeltað. Legg fiskin í fatið og dampa í uml. 10-15 min.

Afturvið. Stokt smá epli, dampað brokkoli, kókaðar gularøtur, fríska asparges. Hollandaise sós. Pynta við dild og sitrónflísum

Tiramisu við rabarbu í port. ella í fat

Rabarbugreytur
- 500 g. av rabarbum, skornar í tern á 1 cm.
- 1 dl. av vatni
- 150 g. av sukri

Javningur
- ½ súpisk av eplamjøli (ella javningspulvur)
- ½ dl. av køldum vatni til at røra eplamjølið í.

Mannagongd:
Koyr rabarbur, vatn og sukur í eina grýtu og lat kóka, til rabarburnar eru kókaðar sundur. Tak grýtuna av plátuni og rør javningin í og set á køl.

Krem:
- 250 g. av mascarpone
- 2 dl. av grikskum jogurti
- 2 dl. av súrróma
- Florsukur

Rør alt tilfarið saman og smakka til við florsukri.

- Ladyfingers
- 1 dl. av kaffi
- 2 súpisk. av mandlulikør (amaretto)

Blanda kaffi og likør saman.

Koyr 1½ keks til hvørja port. og 1½ súpisk. av kaffilikør omanyvir. Legg so lagvís rabarbugreyt, krem, rabarbugreyt og enda við kremi. Stroy eitt sindur av kakaopulvur omanyvir.





Undirsjóvarsteinar úr Skopunarfirði

GLASMONTRA Á TREMUR VIÐ UNDIRSJÓVARSTEINASLØGUM

Nógv elligomul skreytsteinasløg við latínskum heitum vóru funnin á havsins botni, tá arbeiðið við Sandoyartunlinum í Skopunarfirði fór fram. Starvsfólk hjá tunlafyritøkuni NCC góvu av og á Ruth Olsen, matmóðir teirra, sjáldsamar steinar, sum teir funnu.

Tekstur: Beate L. Samuelsen

Í einum húsum í Skopun stendur eitt skáp, sum er nakað heilt fyri seg. Tað stendur í útistovuni hjá hjúnunum Ruth og Stanley Olsen. Hetta er eitt høgt skáp, ein montra, við glashurð.



Stanley og Ruth Olsen

Á glashillunum standa størri og smærri steinar úr øllum møguligum gróttilfari, alt funnið í Skopunarfirði, tá 10,9 km langi undirsjóvartunnilin millum Gomlu Rætt streymoyarmegin og Traðardal sandoyarmegin var í gerð.

Allar hesar vøkru og í mongu førum sjáldsomu steinar hevur Ruth Olsen fingið frá fólki, sum arbeiddu í Sandoyarundirsjóvartunlinum, sum risa stóra norðurlendska byggifyritøkan NCC stóð fyri.

Leigukøkur í Samljóð

Tað var 20. desember 2018 at fyrsta úttakið til Sandoyartunnillin byrjaði. Longu 21. desember 2023 lat undirsjóvartunnilin undir Skopunarfjørði upp fyri almenningi-num.

Ein dagin í 2021 varð Ruth ringd upp og biðin um at taka sær av matgerðini til alt tunnilsarbeiðsfólkið í Skopunarfirði. Barakkin, sum NCC hevði havt standandi á Strondum í sambandi við Eysturoyartunnilin, varð flutt í Sandoynna, og køkurin í samkomuhúsinum Samljóð í Skopun var leigaður til sjálva matgerðina hesi árini, meðan tunnilsarbeiðið fór fram.



Sjáldsom steinasløg úr Skopunarfirði

At standa fyri matgerðini til alt arbeiðsfólkið, 70 tímar um vikuna, var ein stór og ábyrgdarfull uppgáva, ið Ruth tók á seg. Til at hjálpa sær hvønn dag við øllum hesum, fekk hon dóttrina, Winnie Kjærbo.

Ikki bara skuldu tær syrgja fyri stóru, heitu høvuðsmáltíðunum til teir 42 menninar, sum arbeiddu í vaktum nátt og dag. Tær skuldu eisini smyrja matpakkarnar til hvønn einstakan mann hvønn einasta dag, eisini í vikuskiftunum.

Vinarbond knýtt

Ruth og Winnie gjørdu tað, tær vóru mentar og spíladu seg rættiliga út, kókaðu, bakaðu og stoktu mat til alt arbeiðsfólkið. Hetta var góður matur, heilsugóður og vitaminríkur, sum lá leingi á, sum man sigur. Tað skuldi maturin, tí tað var hart og møtimikið arbeiði hjá monnunum at arbeiða á havsins botni, nátt og dag. Hetta var ein strævin, men eisini lærurík tíð, sigur Ruth.

Sum eina tøkk fyri arbeiðið, ið Ruth gekk uppí við lív og sál, góvu arbeiðsmenninir henni av og á gróttilfar, sum teir rendu seg í undir arbeiðinum, ja, líka heilt niðri á 155 metrar dýpi, har undirsjóvartunnilin er djúpast.

Hon og maðurin, Stanley A. Olsen, hava hesa tíðina, meðan arbeiðið fór fram, knýtt nógv vinarbond, og tað eru vinarbond fyri lívið.

Fleiri av teimum, sum hava arbeitt í Sandoyartunlinum, hava seinni vitjað her aftur



Nógv vøkur steinasløg eru at síggja í glasmontruni



Stórt úrval av steinum í stovuni hjá Ruth og Stanley A. Olsen

saman við makum sínum, og vit hava verið og vitjað tey, siga Ruth og Stanley við ein munn.

Hóast alt snúði seg um arbeiði, vóru eisini stundir til meiri hugnaligar løtur saman við arbeiðsfólkunum, t.d. tá skipað var fyri jólahaldi o.s.fr., siga hjúnini.

Tá arbeiðsmenninir komu fram at ymsum sjáldsomum steinsløgum á havsins botni í Skopunarfjørði, vóru teir so beinasamir, at teir av og á høvdu størri og smærri steinar við til Ruth.

Gimsteinar

Fólk, sum hava skil fyri steinsløgum og hava sæð undirsjóvarsmágrótið heima hjá Ruth og Stanley í Skopun, siga, at millum tilfarið eru onkur virðismikil skreytsteina-sløg. Hetta eru steinsløg, gimsteinar, sum gullsmiðir m.a. brúka í arbeiði teirra í kostnaðarmiklum smúkkum, so sum ringum, armbondum, hálsprýði og oyralokkum.

Tað er ikki bara Ruth, sum hevur fingið minni og størri sløg av steinum í sambandi við Sandoyartunnilin. Eisini onnur, sum onkus vegna hava havt samband við arbeiðsfólkið, hava fingið gróttilfar til minnis um tíðina, tá undirsjóvartunnilin var í gerð.

Einki er at taka seg aftur í, at millum steinsløgini, ið funnin eru á havsins botni undir Skopunarfirði, er eisini gróttilfar, ið uttan iva hevur fleiri milliónir ár á baki.

Ferðast runt knøttin

Tað skuldi verið løgið, um ikki okkurt av tilfarinum í skápinum í stovuni hjá Ruth og Stanley A. Olsen stavar frá stóra BIG BANG fyri einum 13 milliardum árum síðani, tá jørðin bleiv til.

Her skal líka nevnast, at Stanley Olsen er nevndarlimur í Pensjónistafelagnum Kvøldarsól í Skopun. Hann er kokkur og hevur frá ungum árum ferðast knøttin runt í arbeiði sínum umborð á føroyskum og fremmandum skipum. Mangan hevur konan Ruth verið við manni sínum á hesum ferðum runt heimin, og hava tey upplivað nógv á hesum uttanlandsferðum.

ÁRSFRÁGREIÐING
VÁRIÐ 2025 - VÁRIÐ 2026

Á seinasta aðalfundi Landsfelag Pensjónista 2025 á Hotel Hafnia12. apríl stóðu tríggir nevndarlimir fyri vali, Alfred Olsen, Beate L. Samuelsen og Ingeborg Vinter. Ingeborg stillaði ikki upp aftur. Hini bæði vóru afturvald, og triði nevndarlimurin gjørdist Maria Olsen, forkvinna í Pensjónistafelagnum Hugna í Klaksvík. Sum varalimir vóru Johild Joensen, Mads Guttesen og Hildibjarta Jacobsen vald.

Á nevndarfundi beint aftaná aðalfundin varð Beate L. Samuelsen afturvald til forkvinnu, og Jákup Andreasen valdur til nýggjan næstformann.

Vár-tiltak
Hósdagin 1. mai 2025 stóð Landsfelag Pensjónista eins og í 2024 fyri einum eldratiltaki á Torginum í SMS. Í panelinum vóru Frida Dam, harðskapsráðgevi í "LIV uttan harðskap" í Kvinnuhúsinum, Anna Rúna Jakobsen, ið tosaði um mammu sína, og formaðurin í Tannlæknafelagnum, Markus Hvannastein, ið tosaði um tannheilsuna hjá eldri.

Aftur í ár var heitt á Landsfelag Pensjónista um at standa fyri várdagstiltakinum við eldra-sofapráti á Torginum í Sølumiðstøðini. Tiltakið var hósdagin 30. apríl. Gestir okkara hesuferð vóru Maria Olsen, forkvinna í Pensjónistafelagnum Hugna í Klaksvík, Hanna Olsen, vitjanarvinur og samskipari av Vitjanartænastuni hjá Reyða Krossi í Runavíkar kommunu, og Sofie Falkenberg, Nudlavirkið, sum greiddi frá puntatiltakinum hjá íslendska happadráttinum DAS.

Eldradagurin 2025
Eldradagurin 2025 varð í Samljóð í Skopun leygardagin 20. september. Saman við Landsfelag Pensjónista skipaðu Pensjónistafelagið "Kvøldarsól" í Skopun og Sunda Pensjónistafelag við ávikavist Onnu Bjørg Leo og Vibeke Ingvarsson sum forkvinnum fyri Eldradegnum.

Sum siður er, vóru fleiri stórir vinningar m.a. gávukort frá Atlantic Airways og Smyril Line.

Størsti vinningur í søgu Landsfelag Pensjónista var eitt gávukort til ferð við Sólorku, áljóðandi kr. 45.000,-, sum Jóan Petur Vang, byggiharri, lat.

Eldradagurin 2026 verður í Varpinum í Klaksvík leygardagin 5. september. Tað er Pensjónistafelagið Hugni í Klaksvík, sum saman við Landsfelag Pensjónista skipar fyri degnum.



Vitjan á Christiansborg í sambandi við fyrilestrar um eldraøkið

”Seniorer NORA´s gullreserve”

Landsfelag Pensjónista er farið í samstarv við norðurnorska pensjónistafelagsskapinum Nordland Eldreråd um eitt tiltak ”Seniorer NORA´s gullreserve”.

Stigtakarar eru tvey umboð fyri Nordland Eldreråd, Bjørn Helge Hansen, leiðari, og Eirik Fiva, nevndarlimur, sum í november vitjaðu umboð fyri Roðan í Eysturoynni og Eldraráðið í Runavík. Fundur var eisini millum norsku gestirnar, forkvinnu Landsfelag Pensjónista, Alfred Olsen, nevndarlim, og skrivara felagsins.

Avgjørt var at velja forkvinnu Landsfelag Pensjónista og skrivara felagsins til kontaktpersónar Føroya í ”Seniorer NORA´s gullreserve”.

Endamálið hjá norðmonnunum var at fáa tætt samband við eitt føroyskt og eitt íslendskt pensjónistafelag og í felag samskipa fyri tøttum samstarvi. Endamálið er at søkja norðurlendska felagsskapin NORA um fígging til eina stóra verkætlan, sum skal fara av bakkastokki um tvey ár.

Vit hava longu tikið lut í fleiri videofundum. Farið verður tó ikki í gongd av álvara, fyrr enn fígging er fingin úr NORA, sum hevur sett hálva millión krónur av til ymsar verkætlanir í norðurlendskum høpi.

Um tað eydnast, verður byrjað í august/ september 2026.

Álvarslig mál

Varpast skal ljós á at meta okkum eldri sum eitt virðismikið tilfeingi við at basa aldursmismuni í norðurlendskum samfelaghøpi og ikki, at vit verða mett sum ein byrða.

Á videonevndarfundi í januar samdust vit um at arbeiða við tveimum uppskotum frá hvørjum limafelag sær, um seniorpolitikk og seniororku, og hvat vit kunnu læra av hvørjum øðrum.

Annað uppskotið frá Landsfelag Pensjónista var at virka fyri, at eldri, uttan mun til aldur, skulu hava møguleika at halda fram á almenna arbeiðsmarknaðinum uttan, at inntøkan skal ávirka pensjónina. Hetta tí samfelagið vantar arbeiðsmegi innan eldra- og umsorganarøkið.

Hitt uppskotið frá okkum var at hugsa um eldri, tá tað snýr seg um tannheilsu, og hvussu stóran týdning tað hevur, at ansað verður eftir tannheilsuni hjá teimum, sum búgva á røktarheimum og ikki hava møguleika fyri flutningi at møta hjá tannlækna ella sita í einum vanligum tannlæknastóli. Samstarv við heilsumyndugleikarnar og Heilsutrygd krevst fyri at betra um tannheilsuna hjá eldri. Hetta er eitt sera álvarsligt mál. Tannlæknafelagið fór í vár í gongd við at fáa loyst trupulleikan og hevur nýliga sent Heilsumálaráðnum skriv um at gera okkurt við hetta.

Aldursmismunurin basast

Uppskotini hjá Íslandi snúgva seg í hesum sama norðurlendska høpi um harðskap og at basa aldursmismuni av eldri. Hetta eru trupulleikar, nógv eldri kenna alt ov nógv. Nevnast kann einsemi, sum hevur stóra neiliga ávirkan á heilsustøðuna, sum aftur førir við sær etingarólag, rúsdrekka- og sálarligar heilsutrupulleikar.

Ætlanin er at hittast til ein fund í Føroyum í Tórshavn í september 2026, og í Bodø og Reykjavík í 2027.

Umsókn til fígging av verkætlanina "Seniorer NORA´s gullreserve" varð latin NORA fyrst í mars 2026, og fáa vit svar í juni.

Bind ein punt

Á heysti 2025 heitti íslendski happadrátturin DAS á Landsfelag Pensjónista um samstarv. Endamálið var at fáa føroyingar at binda ella hekla smáar puntar úr resttógvi í støddini 15x15 cm til frama fyri føroyskar pensjónistar.

Puntarnir kunnu latast inn til okkurt av LP-limafeløgunum ella beinleiðis til Landsfelag Pensjónista. Síðani fær LP kr. 10 fyri hvønn puntin frá DAS, sum so aftur fer til frama fyri onkrum tiltaki innan eldraøkið í Føroyum.

DAS syrgir fyri at fáa puntarnar seymaðar saman til teppir. Hesi verða síðani seld á uppboðssølu, og innkomni peningurin eisini latin føroyska eldraøkinum.

Íslendski DAS happadrátturin hevur árini undan latið føroyskum stovnum innan eldraøkið fígging til keyp av ymsum venjingartólum, hava vit fingið upplýst.



Frida Dam og Ann Jónsdóttir greiddu frá um Kvinnuhúsið

Tiltakið við puntunum byrjaði 2. februar 2026 og endar 31. august. LP savnar allar puntarnar saman og sendir teir til DAS, sum tekur sær av restini.

Formansfundur

Síðst í januar var formansfundur á Hotel Djurhuus. 28 umboð úr flestu limafeløgunum møttu. Vegna vánaligt veður henda dagin, noyddust m.a. umboðini úr Suðuroynni at melda avboð.

Frida J. Dam og Ann Jónsdóttir, ráðgevar í Kvinnuhúsinum, tosaðu um fíggjarligan og annan harðskap móti eldri. Jógvan Ósá, stjóri í Bústøðum, greiddi frá, hvat Bústaðir tekst við og um verkætlanir, ið hóska til eldri. Hann upplýsti tó, at Bústaðir ongar ætlanir hava at byggja beinleiðis eldraíbúðir.

Á fundinum greiddu umboð fyri limafeløgini frá virksemi teirra síðani seinasta formansfund, bæði tá tað snúði seg um limafundir, útferðir innan- og uttanlands, fyrilestrar, bingo o.a.

Áðrenn fundarlok, greiddi forkvinna LPs frá um íslendska tiltakið "Bind ein punt", ið DAS happadrátturin hevði tikið stig til. Feløgini tóku øll undir við hesum og vildu gera sítt til, at tiltakið fór at eydnast til frama fyri eldri.



Tær tríggjar, ið skipaðu fyri falltrygdarskeiðum runt Føroya land

Falltrygd

Í oktober 2025 bjóðaði felagið Judo Føroyar pensjónistum o.ø. til eitt ókeypis skeið innan falltrygd.

Falltrygd snýr seg um at duga at detta uttan at koma álvarsliga til skaða og síðani at koma uppaftur. Vit kenna øll onkran, sum er dottin og hevur meint seg illa. Summi koma fyri seg, men kenna framvegis snuddirnar, onnur koma ongantíð fyri seg.

Tað snýr seg mangan um sekund, tá tú dettur. Tú tekur armarnar fyri teg. Tú hugsar ikki um, at tað júst er tað, tú ikki skalt gera, tí stórur vandi er fyri at bróta handlið, alboga, øksl, o.m.a.

Á judoskeiðnum fekst tú at vita, hvussu tú skalt detta, tá tú dettur, júst sum okkara dugnaligu ítróttafólk duga uttan at koma til skaða. Tey hava lært at detta. Tað er ongantíð ov seint at læra at detta. Tað kann gerast við at venja heilan, hvussu tú í einum splitt-sekundi sleppur undan álvarsligum skaða, sambært Judo Føroyar. Luttøkan á falltrygdarskeiðunum var ymisk runt landið. Summir pensjónistar luttóku aktivt, meðan aðrir ikki hættaðu sær at vera við í øllum, og í staðin hugdu at.

Aðrastaðni í blaðnum er grein við myndum frá falltrygdarskeiðnum hjá Judo Føroyar. Fallskeiðini vóru hildin í Vestmanna, Tórshavn, Klaksvík, á Giljanesi og Oyrarbakka.

NSK-fundir

Dagarnar 6. og 7. mai 2025 hevði NSK, Nordisk Samarbets Komite, hálvársfund í Lillestrøm, sum liggur eitt sindur uttanfyri Oslo. Júst sum í hinum Norðurlondum vantar arbeiðsmegi innan norska eldraøkið.

Í Noreg eru tey í gongd við eina verkætlan sum snýr seg um at fáa eitt aldursvinarligt Noreg í 2030. Eisini har verður nógv tosað um vantandi eldraíbúðir, umframt trupulleikar hjá eldri í smb. við talgilding, vantandi heimahjálp, tryggari ferðsluviðurskifti o.l.

Á aðalfundinum hjá NSK í Lillestrøm vóru m.a. roknskapur og aðrar frágreiðingar felagsins góðkendar.

Heystfundurin hjá NSK, sum var hildin í Keypmannahavn 5. og 6. november, fór fram í hølunum hjá stóra fakfelagnum Faglige Seniorer.

Áhugavert var at hoyra, hvussu fakfelagið brúkar Vitlíki í dagliga virkseminum. Vitlíki sparir teimum nógva arbeiðsorku, samstundis sum limirnir fáa eina betri tænastu og fáa svar uppá eldra-spurningar alt samdøgrið.

Vitjað var á Christiansborg, har fleiri framløgur vóru. Tosað varð um tænastur á røktarheimum og um vantandi arbeiðsmegi innan eldraøkið. Millum røðararnar var ein borgarstjóri, ein røktarheimsleiðari og eitt starvsfólk.

Millum røðararnar var Mette Kierkgaard, eldraráðharri. Hon hevur síðani sagt ráðharrasessin frá sær. Orsøkin var, at maður hennara er illa plágaður av hjáárini av viðgerð í sambandi við krabbasjúku.

Hoyringsfundir

Politisku myndugleikarnir senda í heilum boð eftir Landsfelag Pensjónista til hoyringsfundir. Nevndin møtir upp til allar fundirnar, hóast tað ikki altíð liggur fyri hjá eini fullmannaðari nevnd.

T.d. kom í heyst uppskot frá Heilsumálaráðnum um kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum, o.a. Í hesum førinum tóku vit undir við uppskotinum, tó við tí viðmerking, at lýst eigur at verða alment við tíðarskeiðinum, tá ókeypis vaksinatiónirnar fara fram.

Ein kunngerð, sum vit fingu til ummælis minni enn tríggjar mánaðir, áðrenn hon kom í gildi, var ein um eftirlit við heimatænastu og eldrarøkt v.m. Gamla kunngerðin var frá 7. apríl 2014 og er ikki longur "up to date".Tann nýggja kom longu í gildi á nýggjárinum 2026.

Í henni stendur m.a., at endalig eftirlitsfrágreiðing skal vera gjørd í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at eftirlitið er framt og latast kommununi og landsstýrisfólkinum í almannamálum.

Landsfelag Pensjónista heldur, at 6 mánaðir er alt, alt ov lang tíð.



Nýggja kunngerðin sipar til, at kommunurnar skulu vera partar av eftirlitinum. Tað heldur Landsfelag Pensjónista ikki. Vit halda heldur ikki, at eftirlit skal fremjast av starvsfólki við neyðugum førleikum frá øðrum kommunum, sum skotið verður upp.

Landsfelag Pensjónista tekur heldur ikki undir við, at eftirlitini verða fráboðað frammanundan, men mæla til, at øll eftirlit vera ófráboðað fyri at fáa røtta støðumyndina av umstøðunum innan heimatænastu og eldrarøkt.

Hækkan av pensjónsaldrinum

Tvey afturvendandi og sera viðkomandi mál eru pensjónirnar og hækkanin av pensjónsaldrinum.

Landsfelag Pensjónista ivast ikki í okkara avgerð og heldur fast við, at pensjónsaldurin ikki skal broytast.

Vit hava havt nógvar fundir við landsins myndugleikar um júst hesi mál, men teir eru hvørki til at høgga ella stinga í. Fleiri ferðir hevur málið um hækkan av pensjónsaldrinum upp í 70 ár verið frammi í løgtinginum. Tá uppskotið seinast skuldi til 3. viðgerð í løgtinginum í mai 2025, tók táverandi landsstýrismaðurin í almannamálum uppskotið aftur í síðstu løtu. Orsøkin var, at málið sambært honum ikki var nóg væl lýst til at koma til 3. viðgerð.

Tað tykist ikki, at politikarar eru samdir um hækkaða pensjónsaldurin, og er uppskotið nú broytt til at snúgva seg um at seta upprunauppskotið um 70 ára aldur niður í 69 ár.

Eitt annað mál var uppskotið um broyting í løgtingslógini um almannapensjónir og viðbót til ávísar pensjónistar. Har vístu vit til eitt hoyringsskriv, ið áður var sent Almannamálaráðnum. Í tí sambandinum mæltu vit á fundi við Trivnaðarnevnd løgtingsins, at mótrokningin í arbeiðsinntøku varð strikað, so sum gjørt er í Danmark. Eisini vístu vit á, at tað ikki er rætt, at man nú fyrst fær pensjónsútgjald ein mánað eftir, at man er blivin pensjónistur og harvið missir eitt mánaðarligt pensjónsútgjald. Síðani hevur verið løgtingsval, og vit hava fingið eina nýggja landsstýrissamgongu, sum í samgonguskjali sínum hevur sett sær fyri ymsar aðrar broytingar sammett við undanfarna landsstýri. M.a. skal mótrokningarmarkið hækka úr higartil galdandi upphædd kr. 61.900-, til kr. 300.000,- í sambandi við arbeiðsinntøku.

Sjúklingaskipan

Nevnast skal, at føroyska heilsuverkið, tað

er Sjúkrahúsverkið, Kommunalu Heilsutænasturnar, Apotekið, Gigni og kommunulæknarnir, skal hava eina nýggja sjúklingaskipan. Tað snýr seg um eina felags journal, sum skal styrkja tvørgangandi samstarvið, stuðla undir heilsu og lætta um gerandisdagin hjá heilsustarvsfólkum. Veitarin av journalskipanini hevur uppsagt samstarvið, og finnast skal ein nýggjur.

Vit hava í mong ár havt eina vælvirkandi talgilda journalskipan, Cosmic. Í sambandi við broytingina hevur Landsfelag Pensjónista verið á fundi við umboð fyri heilsuverkið, sum vildi hoyra, hvat vit hildu um hetta og hvat vit møguliga ynsktu broytt í eini nýggjari journalskipan. T.d. meiri viðgerð í egnum heimi, atgongd til egnar dátur, bílegging av tíð o.m.a.

Leigustuðul

Eitt av seinastu hoyringsskrivunum frá nú undanfarna Almanna- og Heilsumálaráðnum, var uppskotið um leigustuðul. Landsfelag Pensjónista tekur undir við, at húski, sum búgva til leigu í sjálvstøðugari íbúð, skulu hava rætt til leigustuðul, um settu treytirnar verða fylgdar.

Fíggjarviðurskiftini eru mangan trupul hjá pensjónistum, og fólkapensjónin røkkur ikki langt. Landsfelag Pensjónista hevur tí mælt til, at allir leigusáttmálar vera góðkendir av eini kommunalt góðkendari húsaleigunevnd, áðrenn stuðulin verður latin smbr. uppskotinum

Rundskriv

Nú skal ikki alt bara snúgva seg um grenj. Okkurt jaligt hendir eisini viðhvørt í samfelag okkara. Landsfelag Pensjónista fegnast um, at undanfarna landsstýrið tók stig til at strika rundskrivið um 72 ára fráfaringaraldur á almennum arbeiðsplássum.

Ársveitslan

Leygardagin 21. mars 2026 skipaði Landsfelag Pensjónista fyri ársveitslu í Dansifrøi í Havn fyri limir úr øllum landinum við Alfred Olsen sum orðstýrara og Jógvan Fríðriksson, bispi, sum gestarøðara.

Matarskránna tók dugnaligi kokkurin Ruben Busk sær av. Tað var somuleiðis hann sum stóð fyri frálíka matinum í fjør saman við starvsfólkum sínum.

Aftaná borðhaldið varð farið uppá gólv saman við góðum kvøðarum, Rasmus A. Joensen og Ólavur Lydersen. Síðan tók tónleikarin Ólavur Højgaard yvir saman við spælimonnum sínum, Holgar Jacobsen og Paula Magnussen. Dansurin gekk so listiliga restina av kvøldinum til yvir midnátt.

Vit hava longu bílagt veitsluhølið í Dansifrøi til ársveitsluna komandi ár. Hon verður leygardagin 13. mars 2027. Matin fer Rubin Busk aftur at standa fyri, og tónleikin fara Ólavur Højgaard og hansara manning at taka sær.

Blaðið Eldri

Blaðið Eldri nr. 10 kom út í november 2025.

Tórshavn 2. mai 2026
Beate L. Samuelsen, forkv.

Skótalegan við Kirkjuvatn í 1958

Nógv lív var í, tá Skótalið Nólsoyarpálls og Skótalið Sigmund Brestissonar saman við danska skótaliðnum Falkonér Spejderne vóru á legu í Suðuroynni í eina viku. Umborð á Smyrli mannaðu skótaliðini skjótt eitt skiffle-orkestur



Kirkjuvatn

Tekstur: Sjúrður Kjølbro
Myndir: Páll Thomsen og Bambus

Eg gav fyri rúmari tíð síðani blaðleiðsluni lyfti um, at eg møguliga kundi skriva eitthvørt, sum lesarin av blaðnum møguliga hevði áhuga í. Men so var spurningurin, hvat eg nú skuldi finna uppá at skriva um.

Eftir at hava hugsað meg um, kom eg eftir, at tað var kanska eitt hugskot at greiða frá onkrari av mongu skótalegunum, sum eg luttók í seinast í 1950-unum, og nakað eftir tað. Valið fall á eina minniliga ferð við Kirkjuvatn í Famjin.

Skótatónleikur umborð á Smyrli

Vit í Skótalið Nólsoyarpálls (SNP) vóru um 25, og vit skuldu vera saman við tveimum øðrum skótaliðum. Tey vóru Skótalið Sigmund Brestissonar (SSB), sum vóru um 40, og síðani Falkonér Spejderne frá Frederiksberg, sum eisini vóru um 25 í tali, so samanlagt vóru vit um 90. Hetta høvdu vit ikki roynt fyrr, so hetta var ógvuliga spennandi.



Vit venja til skótateitið. Aftasta rað: Doffe og Otto Juul. Miðraðið: Jónbert, Sjúrður og Kaj. Fremst: Jákup Sofus

Vit fóru úr Klaksvík um 20. juli til Havnar við "Britons Pride", og eftir at hava verið nakrar tímar í Havn, fóru vit umborð á gamla "Smyril". Hesin hevði dampmaskinu, har fýrt varð við koli. Seinni fekk hann oljufýr til dampketilin.

Veðrið var gott, so eg haldi ikki, at tað bilti stórvegis við sjóverki hjá nøkrum.

Minnist sera væl hovmeistaran úr Vestmanna, sum varð kallaður Lítlipoul. Hann var ógvuliga blíður við okkum, og eg haldi meg minnast hann siga, at hann sjáldan hevði havt so lívlig ferðafólk í salongini.

Tað var soleiðis, at fleiri av skótunum høvdu guitar við, og eg hevði mína harmoniku. Ein, sum var heilt framúr at spæla og syngja, var Kári Mouritsen úr Snikkarastovu. Tað, sum hann sang og spældi, tað kendu vit, so tað var so skjótt, so høvdu vit eitt skiffle-orkestur. Jú, har var lív í.

Kára komu vit øll at kenna seinni, tí hann var ein av teimum í Faroe Boys, og seinni var hann við í Harkaliðnum. Ferðin suður tók um 3 - 4 tímar, og tá ið hini ferðafólkini fóru í land, takkaðu tey okkum fyri gott undirhald. Hetta vóru tey ikki von við.

Lastbilaflutningur í Suðri

Eg kann ikki minnast, at vit fóru í bussar. Nei, vit fóru upp á lastina á fleiri lastbilum. Tað hevði ikki borið til í dag. So varð koyrt avstað. Hetta var sera spennandi.

Tá vit komu til Øravíkar, varð snarað til høgru.

Vit fingu at vita, at vegurin um Øraskarð, tað var ikki bara bara. Ógvuliga bratt. Sum vit nærkast skarðinum, tá varnast ein av eldru donsku skótunum klettarnar, ella stóru steinarnar, sum stóðu við vegkantin í niðara borð, sum eitt slag av trygd. "Sådan et autoværn har jeg aldrig set før", lat í honum. Tá svaraði ein av okkara eldru skótum - á gøtudonskum, at hatta var ikki nakað autoværn. Hatta vóru minnisvarðar



Vestan fyri Suðuroynna. Soleiðis hevði neyvan verið gjørt í dag

yvir tey fólk, sum vóru bóltaði út av tromini við teirra bilum.

"Færøsk humor, den er sgu barsk", helt hann fyri. Hetta var sjálvandi sagt í skemti, um vit kunnu kalla tað so.

So komu vit til bygdina, og vit steðgaðu við kirkjuna. Síðani var at fáa alt viðførið av lastbilunum.

Tað, sum vit ikki høvdu á bakinum, tað bóru vit ímillum okkum. Vit skuldu vera har í eina viku, so tað var so mangt, sum vit høvdu tørv á. Proviantur, kókiútgerð, grýtir, pannir, og ikki minst, tjøld og soviposar. Eg haldi, vit gingu tvær ferðir, áðrenn alt var komið niðan til Kirkjuvatn.

Eystan fyri vatnið er ein nokkso stórur slætti, har tjøldini skuldu standa. Har bar eisini væl til at spæla bólt, og eg kann serliga minnast ein av havnaskótunum, Kaj Aage Troest, sum skjeyt so hart, at bólturin oftani endaði langt úti á vatninum. Vit minnast seinni Kaj Aage sum stovnsetaran av fimleikafelagnum STØKK, sum hann leiddi við hepni í mong ár.



Danial Krosstein, Páll Josephsen og Oddni Biskopstø gera kaffi



Skótateitið 1958/59. Doffe og Kaj Kallsberg spæla ein skemtileik

ivaleyst fyrr verið í vinnu í Grønlandi. Vit skuldu sigla fram við bjørgunum – líka suður til Beinisvørð. Hetta var spennandi, og donsku gestirnir høvdu ikki upplivað slíkt fyrr. Hetta hjálpti væl til, nú ikki alt hevði gingið eftir ætlan.

Illveður brast á

Tá ið vit høvdu búleikast har uppi í 3 ella 4 dagar, og høvdu havt tað heilt einastandandi, tá hendi tað, sum ikki mátti henda. Tað gjørdist av ringasta veðri, og tað við nógvum regni.Tað var ómøguligt at hava tjøldini standandi, tey, sum ikki longu vóru farin í luftina. Leguleiðslan gjørdi av, at her gjørdist onki. Vit máttu bjarga tí, sum bjargast kundi, og síðani sleppa okkum oman í bygdina. Hetta var um náttina, men ikki heilt myrkt.

Møguliga hava famjiningar stúrt fyri okkum, tí vit fingu innivist í tveimum ella trimum húsum nokkso skjótt. Okkara lið saman við onkrum øðrum sluppu inn í skúlan. Eg kann minnast, at fýrt varð dúgliga í kolovninum, og snórar vórðu spentir í skúlastovuni, so klæðir og annað kundi turkast. Alt var gjøgnumbloytt. Dagin eftir var veðrið gott.

Hvat var nú at gera? Jú, leguleiðslan hevði tosað við teir, sum høvdu nakrar trivaligar bátar liggjandi við lendingina. Hesir høvdu

Ein av bátunum minnist eg serliga væl. Hann var nýggjur, hevði navnið "Edilingur" og vit kappaðust um at sleppa umborð á hetta snotuliga far. Teir, sum áttu bátin, vóru Hans J. Petersen og Trúgvi Nielsen, sum eg seinni í lívinum kom at sigla saman við. Dúgligir menn.

Rullitúrur norður um Suðuroyarfjørð

So kom dagurin, vit skuldu til hús. Tað rullaði illa, og eg kann minnast, at vit steðgaðu út fyri bygdini í Skúgvi, har bátur kom út við onkrum.

Tá vit gingu niðan eftir Áarvegnum, lat skyldmaður mín Jógvan meg vita, at vit skuldu niðan til Birruna og Zacharias á Skipafelagnum, sum var mammubeiggi hansara. Tey tóku væl ímóti okkum, og har manglaði onki.

Tað hevur ikki eydnast mær at finna nakað skrivligt tilfar frá hesi minniligu ferð. Eitt nú, hvørjir vit vóru, sum luttóku. Vit í SNP høvdu verið á fleiri legum frammanundan, so tað er ringt at minnast, á hvørjari legu



F.v: Bjarni Hammer, Jørgin Rubeksen, Nick Thomsen, Kalmar og Rúni Øster

vit høvdu verið saman – og ikki. Tað kann skjótt koma bland í.

Hinvegin, minnist eg væl fleiri av teimum í SSB, sum vóru við, tí vit høvdu ikki verið saman við teimum fyrr. Men okkara leiðarar í SNP vóru Sjúrður Josephsen, sum var 20 ár, og Jógvan Kjølbro, sum var 18 ár. Lat okkum sættast við tí, tí at gita, hvørjir hinir vóru, tað nyttar onki.

Tað er kanska áhugavert fyri onkran at nevna teir skótar í SNP, sum vóru á liðnum tey árini frá 1957 til 1961. Ein av okkum var Páll Thomsen, sum var óførur at taka myndir, sum hann sjálvur framkallaði. Myndatøka tá í mun til í dag, tað er hvør sítt.

Eg minnist teir allar flestu, men tað er tó við fyrivarni. Onkur kann vera gloymdur, so tað fari eg at biðja lesaran bera yvir við mær. Myndirnar hjá Pálli hava verið hentar og áhugaverdar.

Skótalið Nólsoyarpálls

Her eru skótarnir í SNP tað tíðarskeiðið:
Páll Josephsen, Ísak Poulsen, Jóannes Leivsgarð, Kaj Kallsberg, Otto Juul Sjóstein, Christoffer (Doffe), Michael Matras, Eliesar Kastalag, Sjúrður Josephsen, Danial Krosstein, Karl Josephsen, Oddni Biskopstø, Álvur Josephsen, Petur Petersen, Jónbert Poulsen, Martin Nielsen, Jákup Poulsen, Páll Thomsen, Kåre Ullman Knudsen, Eyðun Joensen, Sofus Hansen (úr Leynum), Brynjálvur Borðoy, Jákup Sofus Joensen, Kai Eysturdal, Oddmar Juul Samuelsen, Jørgin Joensen (Rituvík), Jógvan Ziska Ziska, Ólavur Thomsen, Jógvan Lützen, Jallgrímur Petersen, Hans Eli Hansen, Oddbjørn Vágslíð, John Ivar Venned, Maison Mellemgaard, Hans Jákup Rasmussen, Jóan Karl Høgnesen, Johnny Thomsen, Jóannes Matras, Ziska Joensen, Hans J. Petersen (Ánir), Hans Hendrik Mikkelsen, Páll Poulsen (á Bumshamri), Karl Martin Biskopstø (Meiddi), Sjúrður Kjølbro.

Nógvir av hesum vóru sjálvandi við í Famjin. Eg var tann yngsti.

Sum eitt kuriosum, so haldi eg vert er at nevna, at allir vit í SNP, Skótalið Nólsoyarpálls, vórðu eina ferð boðsendir at koma á sjúkrahúsið at taka eina blóðroynd, so vit møguliga kundu gerast blóðdonorar.

Vit vóru fleiri, sum líka síðani vóru donorar nógv ár fram.

Skótalið Sigmund Brestissonar

Sum sagt, so minnist eg fleiri av skótunum úr Havn, men Marius Rein, sum var við, hann minnist serliga væl. Yvirlitið viðv. SSB skótunum, Skótalið Sigmund Brestissonar, í Famjin er hetta:
Símun Askham, Tummas Juul Askham, Suni Wardum, Jóannes Wardum, Gunnar Ihlen, Hjalti í Jákupsstovu, Rolf Guttesen,

Olaf Magnussen, Heðin Jacobsen, Bjarni Johansen, Erling Johannesen, Tórhallur Patursson, Marius Rein, Knud Knudsen, Svend Erik Knudsen, Sverri Jacobsen, Hjalmar Petersen, Hans Mortensen, Bjarki Mortensen, Heðin Mortensen, Bjarni Rein, Jákup Jacobsen, Arni Rein, Eyðbjørn Hansen, Bjarni Rubek Nielsen, Helgi Debes, Mortan Mortensen, Dan Mortensen, Tummas Arge, Finn Jacobsen, Heðin Samuelsen, Jørgen Lützen, Tórður Jóanson, Magnus Pauli Magnussen, Magnus Pauli Joensen, Kjartan Kristiansen í Jákupsstovu, Bogi Samuelsen, Jóanes Johannesen, Mads Andrias Winther, Egga Jensen og Poul Michelsen. Ivaleyst var onkur afturat. Ber yvir við okkum.

Tað vóru eisini nakrir kvinnuligir skótar úr Havn við. Minnist bara Bjørg Matras (seinni Jensen). Aftur her var Marius hollur, tí hinar vóru:
Áshild Midjord, Sunnuvá Lindenskov, Doris Blaasvær, Lula Djurhuus, Gunvør Christiansen, Ketty Hansen, Karin Stærmose, o.fl.

Aftur á slóðina 68 ár seinni

Ein minnilig ferð var at enda komin. Árið eftir vóru vit í SNP á stórari skótalegu í Ebeltoft, har 10 túsund skótar úr allari verðini luttóku. Det Danske Spejderkorps hátíðarhelt, at tað vóru 50 ár síðani stovnanina av rørsluni.

Eg havi seinastu mongu árini ætlað mær enn eina ferð niðan til Kirkjuvatn, og í summar fekst tað í lag. Tað var eitt lítið ferðalið, sum fór avstað.Vit høvdu fingið loyvi til at fara niðan.

Tað var nakað heilt serligt at koma aftur har – 68 ár seinni, til hesa sera vøkru náttúru.

Tá vit komu oman aftur, stóð Edvard Magnussen fyri okkum, og bjóðaði okkum inn. Hann kendi eg nakað frá ungu døgunum, og konu hansara Áslu kenni eg, tí hon er úr Klaksvík. Hon hevði sett alt gott á borðið, og vit høvdu eina sera hugnaliga løtu hjá teimum.

Eina stóra tøkk fái tit frá okkum.



SNP 1958/59

"Bind ein punt" gav góðar 40.000 krónur

Tiltakið fór alt fyri eitt á rull í februar og helt fram til í summar



Nevndin í Landsfelag Pensjónista uttanfyri skrivstovu felagsins á Argjum, tá peningagávan varð handað felagnum av Niels Una Dam. Aftara rað frá vinstru: Alfred Olsen og Astrid Jacobsen. Fremra rað frá vinstru: Johild Joensen, Maria Olsen, næstforkvinna, Gunnleyg Durhuus, skrivari, og Beate L. Samuelsen, forkvinna.

Tekstur: Beate L. Samuelsen
Myndir: Nudlavirkið og Preben Langhoff

Í sambandi við nevndarfund hjá Landsfelag Pensjónista ein av síðstu døgunum í september viku, handaði DAS Happadrátturin felagnum ein gávukekk áljóðandi kr. 40.560.

Hetta var peningurin, ið kom inn í sambandi við stuðulsupphæddina frá tiltakinum "Bind ein punt".

Tað var í fjør, at umboð fyri íslendska DAS Happadráttin setti seg í samband við Landsfelag Pensjónista um at vera við í einum tiltaki undir heitinum "Bind ein punt" í støddini 15 cm x 15 cm. Umboðið fyri DAS Happadráttin í Føroyum, Jana Jensen, fegnaðist beinanvegin umvegis Niels Una Dam, stjóra í Nudlavirkinum sum samskipara, um samstarvið við Landsfelag Pensjónista.

"Tá farið var undir tiltakið í februar í ár, ivaðust vit eitt sindur í, um nakar fór at taka undir við hesum. Ikki gekk meiri enn ein góð vika, so kom ein kvinna til okkara við einum stórum posa á tremur við puntum,"sigur ein fegin forkvinna.

10 kr. fyri puntin

Síðani fór tiltakið á rull rætta vegin. Enntá komu posar til Landsfelagið við Smyrli úr Suðuroynni til Havnar.

Fyri hvønn puntin, sum pensjónistar og onnur bindi- og hekliáhugaðir føroyingar

lótu inn til Landsfelag Pensjónista, vildi DAS Happadrátturin lata Landsfelagnum kr. 10.

Hægsta upphæddin, vit tilsamans kundu fáa, var 50.000 fø. kr.

Peningurin var oyramerktur til okkurt tiltak, sum Landsfelagið hevði hug at skipa fyri, ætlað føroyskum pensjónistum.

Puntatiltakið var sett í verk fyrst í februar 2026 og endaði í summar.

Nógv lokal pensjónistafeløg hava latið Landsfelag Pensjónista óteljandi fullar posar við bundnum og heklaðum puntum, sum limir teirra við stokkum ella heklinál nr. 5 hava sitið og nørklast við heima við hús, í bindiklubbum ella aðrastaðni.

Tá til stykkis kom, fingu vit meiri enn 4000 puntar inn.

Nógvar tógvrestir

Íslendski sjálvsognarstovnurin "Hrafnista", eigur Das Happadráttin. Tað er eisini hann, ið eigur og rekur fleiri ellisheim í Íslandi og annars tekur sær av eldrarøktini har.

"Das Happadrátturin hevur verið í Føroyum í nógv ár, og hava vit serliga tey seinnu árini brúkt ein størri part av vinninginum á føroyska marknaðinum innan føroyska eldrarøkt, tí hetta er í tráð við okkara visjón. Og vit eru sera glað, at Landsfelag Pensjónista tók so væl ímóti hugskotinum "Bind ein punt", upplýsti Jana Jensen, tá samstarvið við Landsfelagið byrjaði.



Tað varð eisini bundið á Gran Canaria

Væl hevur ligið fyri hjá teimum, sum hava bundið og heklað puntar av tógvrestum hesa tíðina. Tað liggur altíð fitt av tógvi eftir, tá vit hava sitið og bundið okkurt plagg.

Sum at vinna í happadrátti

Nú hevur ligið væl fyri at brúkt tógvrestir til frama fyri einum góðum endamáli.
At Landsfelag Pensjónista á henda hátt hevur fingið kr. 10 frá DAS Happadráttinum fyri hvønn puntin til frama fyri onkrum jaligum tiltaki innan eldraøkið í Føroyum, er tað sama sum at vinna í einum happadrátti hvørja ferð.

Átakið "Bind ein punt" gav Landsfelag Pensjónista 40.560 før. kr. og fegnast vit um tann stóra áhugan, tiltakið hevur havt runt landið.

Landsfelag Pensjónista hevur staðið fyri innsavningini. Nú er stóra uppgávan eftir hjá fyriskiparunum at fáa puntarnar seymaðar til hóskandi sniðgivin teppir og selja tey til frama fyri eldraøkið.



Hamragarður í Vági

Bú- og Heimatænastan í Suðuroy 2035:

Framtíðin á eldraøkinum krevur broytingar

Okkum vantar framvegis tær nógv umrøddu heitu hendurnar, sum øll tosa um

Tekstur: Beate L. Samuelsen

Í mai mánaði í fjør setti stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroynni ein arbeiðsbólk. Endamálið við hesum var at leggja eina strategi fyri Bú- og Heimatænastuna, sum skal halda fram til 2035. Hetta skal tryggja eina haldføra, góða og virðiliga eldratænastu, har brúkarar og búfólk eru í miðdeplinum, sum tað stendur at lesa í faldara, ið Bú- og Heimatænastan í Suðuroynni fyri stuttum gav út, nú 10 ára framtíðarætlanin, ið arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við, er liðug.

Eins og flest aðra staðni í Føroyum, stendur eisini eldraøkið í Suðuroynni fyri stórum avbjóðingum, ið krevja broytingar av ymsum slag.

Starvsfólkatrot

Arbeiðsbólkurin hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroynni hevur deilt týdningarmestu broytingarnar upp í fýra høvuðsvisjónir, stendur at lesa í faldaranum frá mars 2026 hjá strategibólkinum um eldraøkið í framtíðini, og hvussu eldraøkið í Suðuroy skal mennast komandi 10 árini.

Fyri tað fyrsta er talan um demografiska trýstið, sum lýst verður við, at talan er um 22,5 % av íbúgvunum, ið eru 67 ár og eldri. Talið veksur við ferð, samstundis sum færri fólk í arbeiðsførum aldri eru tøk til at veita røktina.

Fyri tað næsta er tað bústaðartrotið, har tørvur er á hóskandi bústøðum og millumstigum millum vanlig sethús og røktarheim. Her verður hugsað um eldraíbúðir. Síðani kemur starvsfólkatrotið, sum vit í langa tíð hava vitað fór at koma. Tað merkist longu sera væl, at ov lítil tíð er til nærveru og umsorgan í mun til vaksandi tørvin á heitu hondunum, sum okkum vanta innan eldraøkið.

Fjórða og ein sera týdningarmikil høvuðsvisjón er tað fíggjarliga haldføri, tí rakstrarútreiðslurnar hækka munandi Í 2035 eru tær mettar til 143 mió. kr. Fyri at megna at gjalda stóru millóna krónuupphæddina krevst ein nýggjur fíggingarleistur frá landinum, har lagt verður upp fyri fólkasamansetingini.



Suðuroyar Ellis- og røktarheim á Tvøroyri

Faldarin um "Eldraøkið í framtíðini og hvussu eldraøkið í Suðuroy skal mennast komandi 10 árini", sum Bú- og Heimatænastan í Suðuroy hevur givið út á prent, telur 52 síður. Faldarin er tøkur í talgildari útgávu á bbh.fo. Faldarin fæst eisini í eini stytri útgávu.

Í strategibólkinum sótu: Rúni Rasmussen, verkætlanarleiðari, Una Johanna Nolsøe, ergoterapeutur, Elin Kristina Símunardóttir Viðoy, sjúkrarøktarfrøðingur, og Bára Krosslá Mortensen, fysioterapeutur.

Tey, sum hava sitið í stýrisbólkinum, eru: Heri Norðberg, formaður og stjóri í Bú- og Heimatænastuni, Arni Djurhuus Brattaberg, limur í stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuni, Eyð Eidesgaard, limur í stýrinum fyri í Bú- og Heimatænastuni, og Daimi Kjærbo úr Hørg, eindarleiðari í Bú- og Heimatænastuni.

Heima sum longst

Eitt av mongu ynskjunum innan heilsuætlanini hjá arbeiðsbólkinum at fáa framt í 2035 er, at brúkarin skal hava møguleika at búgva heima sum longst. Við rættari røkt, tænastum og tøkni skal borgarin kenna seg tryggan heima hjá sær sjálvum.

Hjá eldri fólk er tað av stórum týdningi við felagsskapi, at vera saman við øðrum, og hartil hava lívsgleði fyri at fyribyrgja einsemi og betra um lívsgóðskuna.



Eitt gott eldralív kann í stuttum lýsast við hesum fýra orðunum: Tryggleiki, sjálvræði, felagsskapur og virkni. Myndin er av Hamragarði í Vági

Sum nakað nýtt í hesum tíðum er at duga at brúka vælferðartøkni og vitlíki sum stuðulsamboð í gerandisdegnum. Tað kann í mongum førum lætta um dagliga trummerummið.

Sum ein sera týdningarmiklan part innan eldraøkið er neyðugt at betra um samstarvið bæði innan- og uttanhýsis, har leiðslan gongur á odda.

Verksetanartoymi

Tað er so deiliga lætt at seta arbeiðsbólkar at arbeiða við ávísum málum og ætlanum. Og so hendir einki meiri, og arbeiðið dettur niðurfyri.

Fyri at júst hendan heildarætlanin skal gerast til veruleika, skjýtur arbeiðsbólkurin upp, at serligt verksetanartoymi verður sett at fylgja átøkunum í strategiætlanini upp, so hon verður til veruleika og ikki dettur niðurfyri.

Í sambandi við heildarætlanina hjá Bú- og Heimatænastuni eru brúkarar í oynni, starvsfólk og onnur, biðin um at seta orð á, hvat tey halda er eitt gott eldralív (aldurdómur). Í stuttum kunnu svarini lýsast við hesum fýra orðunum: Tryggleiki, sjálvræði, felagsskapur og virkni.

Arbeiðsbólkurin skrivar eisini at "staðfest verður, at nýskipanir og íløgur í nýggjar karmar, eitt nú nýggjan eldradepil, eru neyðugar fyri at tálma útreiðsluvøkstrinum og tryggja dygdina í framtíðini".

Eldradagurin í Varpinum 2026

Livandi løtt løta á gamalsaldri



Borðreitt var við góðum føroyskum smyrjibreyði á miðdegi

Tekstur: Betty og Jógvan við Keldu
Myndir: Klips v/Símun á Høvdanum

”Vit gevast ikki at spæla, av teirri orsøk, at vit gerast gomul. Vit gerast gomul, tá vit gevast at spæla”, soleiðis segði kendi nógv umhildni danski ítróttafrásøgumaðurin Gunnar Nu Hansen, onkuntíð!

Tá vit um middagsleitið leygardagin 5. september í ár trinu inn um høvuðsdyrnar í mentanarhúsinum ”Varpið” til Eldradagin 2026, hoyrdu tónleikin frá Sjúrði Kjølbro í móttøkuni, hugdu niður í hendan rúma ”foyerin”, hoyrdu hugnaliga lívliga prátið millum gestirnar, sum tá longu vóru komnir, kendu vit beinanvegin á okkum, at hetta fór at verða ein dagur við ríkum upplivingum, – So var!

Longu á veg til at hanga jakkar og frakkar í garderobuna, møttu vit fleiri av okkara javnaldrum, nøkur kendu vit ikki beinanvegin, meðan onnur kendu vit og hóast tað, so høvdu vit ikki sæð hvønn annan í fleiri – ja, í mong ár.

Áhugin fyri at tekna seg til dagin hevði verið stórur, so fullteknað var - eini 325 fólk, – sum vóru komin so gott sum úr øllum landinum.

Samstundis sum prátið fánaði niður í onki, beyð forkvinnan í Pensjónistafelagnum "Hugni", Maria Olsen, øllum at vera vælkomin við ynskjum um, at vit øll fingu ein góðan dag! – Síðani var ábit, søla av lutaseðlum, meðan prátið gekk væl og gjørdist lívligari, sum løtan gekk.

Tá vit hugdu yvir allar hesar javnaldrar okkara – ja, +/- fá ár – komin so langt í lívinum, bar illa til ikki at hugsa um tað, hesi fólk vóru farin ígjøgnum av uppliving-um og royndum og sjálvandi tíðir bæði í sorg og gleði gav tað okkum øllum nakað at hugsa og tosa um!

Eftir at fyrsta løtan var av, vóru ymiskar vitjanir í vinnu og mentan lagdar tilrættis, har ein og hvør gjørdi, sum honum listi og har áhugin var.

Vitjanir vóru í Kirkjukjallaranum á Christianskirkjuni, har hugt varð eftir spennandi



Maria Olsen tekur ímóti, tá gestirnir koma i Varpið

listaverkunum hjá Edvardi Fuglø. – Onnur fóru á vitjan í Føroya Bjór, sum hevur sína søgu frá 1884. – Nólsoyarpáls húsið, har Archibald Black, listamaður og skyldmaður Nólsoyarpáls, hevur við hepni bygt upp av nýggjum garðin. – Aftur fóru nøkur í nýggja framkomna kappróðrarneystið.



Um trý-tíðina fekst aftur kaffi og køkur.

Kl. 16.30 var farið til búgvið døgverðaborð, har Kári Sólstein var borðstjóri. Orkestur við Noel

Framhald á síðu 56

Sjúrður Kjølbro spælir klaver á Eldradegnum



Kvinnur hugna sær



Hanus á Gørðum, prestur og konan Mena uttanfyri Varpið



Hans Jacob á Kósini vísir veg til vitjan á Føroya Bjór



Kári Sólstein var orðstýrari



Símun Fornagarð verður kannaður fyri diabetes 2, eins og nógvir aðrir gestir



Borðhaldið á Eldradegnum í Varpinum

Joensen og Olgar Petersen, fingu felagssangirnar at "runga".

Karl H. Johansen, borgarstjóri, bar fram eina heilsan, har hann fegnaðist um, at so mong fólk vóru komin "allastaðni" frá í landinum.

Høvuðsrøðuna helt Hanus á Gørðum, fongsils- og hospitalsprestur, har hann við væl evnanum orðum nam við "listina" at duga at gerast gamal og legði dent á, hvussu umráðandi tað var at gerast "glaður gamal" og vera aktivur.

Onkrar heilsanir vórðu bornar fram og síðani hevði Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, løgtingskvinna, lítla løtu við skemti.

Borðhaldið var livandi og lætt bæði í søgdum og sungnum orðum og prátið við borðini, har nøkur av okkum kendust og onnur komu at kennast.



John og Charlotta Thorsteinsson og Johanna Jensen



Maria Olsen handar Ninni Olsen, fyrrv. forkvinnu í Hugna, lutaseðlavinning frá Atlantic Airways



Tónleikararnir Johannes Poulsen, Noel Joensen og Olgar Poulsen

Møguleiki var hjá gestunum at verða kannaðir fyri diabetes 2 av sjúkrarøktarfrøðingum frá Landssjúkrahúsinum

Eftir ein avbera góðan og væl tilrættalagdan dag, sum Pensjónistafelagið "Hugni" hevði skipað fyri, varð farið upp á gólv, fyri tey, sum ynsktu tað.

Eftir hetta tók Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista, orðið og við vælvaldum orðum takkaði hon fyri dagin

Til seinast endaði Maria Olsen, forkvinna í Pensjónistafelagnum "Hugni" fyri dagin, ynskti, at øll komu væl heimaftur!

Kunngjørt var síðani, at komandi Eldradagur í 2027 verður í Vestmanna.

Eftir ein tílíkan upplivingarríkan dag, har nógv varð tosað, har góð sambond fingu lív aftur í "gamlar dagar" samstundis, sum nýggj gevandi sambond vórðu knýtt, kundu vit fara mótaði inn í nýggja viku við góðum minnum.

Nei sanniliga, kunnu vit gera orðini hjá Gunnari Nu Hansen, til okkara!

Sum gestir á Eldradegnum 2026 takka vit bæði fyri ein fínan dag. – Harrin signi tykkum øll og okkara kæra land!!



Føðingardagskøka hjá Pensjónistafelagnum Hugni



Betty og Jógvan við Keldu

AVSLÁTTARAVTALUR HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA

NOVEMBER 2026

Landsfelag Pensjónista hevur fingið nógvar góðar avsláttaravtalur við handlar, hotell, matstovur og aðrar fyritøkur.

Limirnir í teimum 16 lokalfeløgunum kring landið kunnu fáa avsláttur úr 5% upp í 50% av vørum og tænastum frá ymsum handlum, hotellum, matstøðum og øðrum fyritøkum kring landið.

Avslátturin er treytaður av, at limur vísir fram persónligt limakort frá Landsfelag Pensjónista.

Limirnir fáa limakort við at venda sær til sítt lokalfelag og nýggir limir við at tekna seg hjá lokalfelagnum.

Avsláttaravtalurnar liggja eisini úti á heimasíðuni www.eldri.fo.

Í Tórshavn

Nice 15%	Av barnaklæðum 0-16 ár	270200
Hoyrnin 10%	Av hoyritólum	321731
Hennara ..... 10% Kvinnuklæðir	Av øllum vørum uttan tilboðsvørum	274075
Tignir – væl klæddir menn 15% Mannfólkaklæðir	Av øllum vørum	292900
Fótbúni ..... 10% Skósøla	Av øllum vørum	311705
Gunnvá ..... 15% Kvinnuklæðir	Av øllum vørum	214206
Toscana 10%	Mán. til hósd. og sunnudag	211109
Angus Steakhouse 10%	Av øllum mati mánadagar	717777
Hotel Hafnia 15%	Frokostbuffet í matstovuni og av øllum á Kafé Kaspar	313233
Hornið, SMS 10%	Av øllum vørum	233423

Jógvan Weihe 10%	Av øllum vørum		353897
Hjá Kissa ..... 15% Mannfólkaklæðir			311395
Bailine 10%	Av viðgerðum		280554
Tórshavnar Maskinhandil . 15%	Av øllum vørum uttan tilboðsvørum		313442
Hitapumpur.fo 10%	Av hitapumpum við montering. Um 3 keypa saman		212204 312204
Touché ..... 10% Mótahandil	Av øllum vørum uttan tilboðsvørum		603300
P/F Waag 10%	Av dekkum		313666
SRI ..... 10% Máling	Av øllum uttan glasvevi		313030
in·tone clinic	Viðgerð við infrareyðum hitateppi 100 kr. Vødda- og pínuviðgerð 120 kr.		516114
Salong Liljan ..... 15% Torfinsgøta 6	Hárviðgerð, mán.-fríggj. áðrenn kl. 13		314768
Kaffihúsið ..... 10% Bryggjubakki 14	Av øllum mati		358787
Havgrím Seaside Hotel ... 10% Yviri við Strond 14	Av øllum mati og gistingum		201400
Muna v/Høgna Waag 10%	Bókin "Mín lívsleið". Ókeypis útkoyring		767601
Valdemar Lützen ..... 15% Byggibúð & Lásatænasta & Rustfrí Heilsøla, Skálatrøð 14	Av øllum vørum		301020
Marjun Wolles 15%	Stjørnuløtur - Kærleikin gloymir ei Fløga og tekstur		271664
Hotel Djurhuus ..... 10% Yviri við Strond 19	Av mati og gisting		355500
Fló Tøknihjálp 30%	Av allari tøkniligari hjálp (telefonir, teldir og teldlar, v.m.)		227375
Thomas Dam á Hálsi ..... 10% Heykavegur 3	Av øllum vørum		311400
Mensendieck Online 25%	Av mánaðarhaldinum til Mens. Online		515755
Petri Tannklinikk 10%	Av protesum og útvaldum tannviðgerðum, ið ikki fáa almennan stuðul		320320
Frihedsbrevet.fo 50%	Av árshaldi	hey@frihedsbrevet.fo	

Í Vágum

Unicar	10%	Av øllum leigubilum	544000
Frisørsalongin MidWay	15%		213055
Ursmiðjan	10%	Av øllum brillum	332024
Carrent.fo Vága Floghavn	10%	Av øllum leigubilum	783000
TATink v/Tummas Albert	20%	Av arbeiðsløn upp á bilumvælingar	551133
Smiðjan	10%	Av øllum mati	588184
Tannlæknast. í Sandavági	10%	Av protesum og útvaldum tannviðgerðum, sum ikki fáa almennan stuðul	332726
Fiskastykkið	10%	Av øllum mati	289834
Handilsvirkið Niclasen	10%		332001
Hotel Vágar	10%	Av gistingum (uttan morgunmat) Kota: PENSJÓN10 ella ring 309090	289834
Gásadalsgarður	10%	Av øllum mati	277013

Í Sandoy

Búrhandilin í Skopun	10%	Av tógvi og gávulutum	361519

Í Suðuroy

Richard B. Thomsen & Søn Timburhandil A/S	20%	Við kontantsølu	661000
EL-handilin á Tvøroyri	10%		371296

Í Norðoyggjum

Linsan Optik 15% Stoksoyrarvegur 15 Klaksvík	Av brillustellum og -gløsum		313133
Sjómansheimið 10% Hotel Klaksvík	Av leigan av kømrum		455333
JAP, klædnabúð 10%			456880
Vera Klipt 10%	Av allari hárviðgerð		455677
Hvíthús 10%	Av klædnavørum		455353
Seymistovan Hei-Mai 10%	Undantikið føroyski búnin		457162
Leivur Ellingsgaard 10%	Ur, gull, silvur, brillur		455203
Hjá Skós 10%	Av øllum skóm		455057
Angus Steakhouse 10%	Av øllum mati mánadagar		457777
El-in 5%	Av øllum vørum uttan tilboðsvørum		284513
Norðoya Litbúð 15%			457300
Klaksvíkar Autolakering 10%	Av øllum vørum		458787 / 288787
Bil & Dekkverkstaðið 10% Við John Heinesen	Av øllum billutum		456959 / 217861
Kósabúðin 10%	Av øllum vørum		455000

Í Eysturoy

Diana 10%	Av øllum hondarbeiði og ítrivsvørum uttan toy til føroyska búnan, seymimaskinum og lampum	448125
Ur og brillur 10%	Av øllum brillum	447950
Rokoko, klædnahandil 10%	Av øllum klæðum	441039
Brá, mótahandil 10%	Av øllum vørum uttan tilboðsvørum	422727
Shari, mótahandil 10%	Av øllum vørum uttan tilboðsvørum	454646
Skósøla við Terje Hansen 10%	Av øllum vørum	441018

YVIRLIT YVIR PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØGINI Í FØROYUM 2026

Landsfelag Pensjónista

Løkjatún 1, 160 Argir, tlf. 219394,
t-post: lp@eldri.fo,
heimasíða: www.eldri.fo

Limafeløgini:

1. Pensjónistafelagið Hugni
Fundarstaður: í Smæruni, Kjalarvegur 48,
Maria Olsen, forkvinna, Geilin 34, 700
Klaksvík, tlf. 282171, t-post:
farotek@hotmail.com
Limatal: 180 Felagið stovnað: 19.10.1971

2. Eldrafelagið Fjallið
Hannilena Jacobsen, forkvinna, Við Ranggil
11, 520 Leirvík,
tlf. 756594, t-post: hannilena@gmail.com
Limatal: 55 Felagið stovnað: 18.03.1991

3. Eldrafelagið Borgin
Fundarstaður: Toftagøta 9, Fuglafjørður,
Áshild Kristiansen, forkvinna,
Fjalsvegur 6, 530 Fuglafjørður,
tlf. 214621 og 580025,
t-post: ashild.kristiansen@skulin.fo
Limatal: 150 Felagið stovnað: 16.02.1985

4. Oyndarfjarðar Pensjónistafelag
Jørmund L. Juul, formaður, Tartavegur 5,
690 Oyndarfjørður,
tlf. 211918, T-postur: jljuul@olivant.fo
Limatal: 30 Felagið stovnað: 02.10.1991

5. Eldrafelagið á Toftum
Fundarstaður: á Kneysum 14, Toftir,
Alfred Olsen, formaður, Rókavegur 24,
656 Saltnes,
tlf. 447960 og 210960,
t-post: 1947ao@gmail.com
Limatal: 85 Felagið stovnað: 09.09.2015

6. Eldrafelagið Nón
Torvgøta 2, 600 Saltangará, Johild
Joensen, forkvinna, á Byrgisheyggi 5,
627 Lamba,
tlf. 448738 og 288738,
t-post: johildjoensen@outlook.com
Limatal: 154 Felagið stovnað: 16.09.1987

7. Eldrafelagið Kumlá
Elias Hansen, formaður, Skálavegur 92,
480 Skála,
tlf. 441188, t-post: eliassonja@gmail.com
Limatal: 36 Felagið stovnað: 15.02.1992

8. Pensjónistafelagið í Sjóvar Sókn
Petur Jákupsson, formaður,
Skúlavegur 4, 490 Strendur,
tlf. 257987, t-post: pj0106d7@skulin.fo
t-post:
sigrunandreasdanielsen@gmail.com
martin@olivant.fo
Limatal: 80 Felagið stovnað: 24.10.1988

9. Eldrafelagið á Eiði
Jóhanna á Fløtt forkvinna,
á Brekkuvegi 26, 470 Eiði,
tlf. 224809, t-post: olavurflott@gmail.com
Limatal: 36 Felagið stovnað: 26.03.2009

10. Sunda Pensjónistafelag
Vibeke Ingvarsson, forkvinna,
Norðskálavegur 36, 460 Norðskáli,
tlf. 267346 og 422226.
t-post: v_ingvarsson@hotmail.com
Limatal: 82 Felagið stovnað: 03.02.1985

11. Pensiónistafelagið í Havn
Fundarstaður: Bridgehúsið,
Hoydalsvegur 21, 100 Tórshavn
Helena Reinert Eliasen, forkvinna
PfH tlf. 284881, teldupost: pfh@eldri.fo;
Limatal: 500 Felagið stovnað: 20.05.1976

12. Eldrafelagið Vesturskin
Fundarstaður: Missiónshúsið,
Páll Hellu, formaður, Niðari Vegur 69,
350 Vestmanna,
tlf. 252054, t- post: hellupall@gmail.com
Limatal: 90 Felagið stovnað: 28.05.1984

13. Vága Pensjónistafelag
Fundarstaður: í Ivanshúsi, c/o.Vesturvón,
Kálvalíðvegur 2, 370 Miðvágur,
Thurid Olsen, forkvinna,
við Stóraklett 12, 360 Sandavágur,
tlf. 221432,
t-post: thurid56olsen@gmail.com
Limatal: 200 Felagið stovnað: 30.11.1981

14. Pensjónistafelagið "Kvøldarsól"
Anna Bjørg Leo, forkvinna,
Garðavegur 7, 240 Skopun,
tlf. 229827, t-post: annabjorg2@msn.com
Limatal: 39 Felagið stovnað: 29.04.1982

15. Pensjónistafelagið HØFT
Jens Johannesen, formaður, Heiðatrøðin
5A, 800 Tvøroyri, tlf. 571770 og 371770,
t-post: jens571770@gmail.com
Limatal: 36 Felagið stovnað: 28.12.1981

16. Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy
Ingeborg Vinther, forkvinna,
Geilin 38, 900 Vágur,
tlf. 573427, t-post: vinther@mail.fo
Limatal: 60 Felagið stovnað: 19.09.1985


Eldri
Landsfelag Pensjónista
Løkjatún 1 · FO-160 Argir
Tel: 21 93 94
T-postur: lp@eldri.fo
www.eldri.fo